# FFbladið

BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 303 Hósdagur 16. oktober 2003 10,-




Síða 25

## Dýpið skuldi loddast eftir fólkaatkvøðuna í 1946

Vit hava eitt higartil ókent ískoyti til søguna aftaná fólkaatkvøðuna.

## Framstig í Fugloy: Kundu rógva til Svínoyar at ringja!



Vit hava samrøðu við hin knapt 98 ára gamla Eliesar Sørensen, ættaður av Kirkju. Hann hevur upplivað alla menning í samfelagnum.

Síða 11



# Laksur frá veiðu í Alaska til sølu av føroyingi í USA

Vit fylgja laksi frá tí, hann er veiddur, og til hann av vágbingi endar á sølumiðstøð í USA.

Síðurnar 13, 15 & 20

## Nýtt dømi um serføroyska løgfrøði

Skattalógin verður nýtulkað til skaða fyri borgaran - eftir minst 40 ára fasta mannagongd.

Síða 24



## Frágreiðing frá Fiskamarknaðinum

Frágreiðing frá Fiskamarknaðinum vísir, at prísirnir kvinka upp eftir.

Síða 7

## Sálarheilsudagur

Seinasta fríggjadag varð altjóða sálarheilsudagurin hildin við skrúðgongu oman á vaglið, har m.a. sálarlæknin Tormóður Stórá helt røðu.

Síða 2

## Rækjuskip og Arctic Viking

Síða 5







FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

FF-blaðið: Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
Útgevari: Føroya Fiskimannafelag

Blaðstjóri: Óli Jacobsen
Layout: Føroya Fiskimannafelag
Prenttilgerð: Føroya Fiskimannafelag
Prent: Prentmiðstøðin

Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin

- kemur út annanhvønn hósdag



# Sálarheilsudagurin

**Seinasta fríggjadag varð altjóða sálarheilsudagurin hildin við skrúðgongu oman á vaglið, har m.a. sálarlæknin Tormóður Stórá helt røðu. Hann segði m.a.:**

Vit hava oftani lyndi til at tosa um tey sálarsjúku sum ein serligan bólk av fólki, og kann hetta geva fatan av, at hesi øll líkjast á ein ella annan hátt, eru eins. Men soleiðis er í grundini ikki. Eins og við deyðanum, so hyggja sálarsjúkurnar ikki eftir tonnunum. Tær kunnu raka fólk í øllum aldursbólkum, frá børnum til oldingar. Kvinnur og menn. Rík og fátøk. Klók og minni klók. Fólk norðanfjørðs og fólk sunnanfjørðs. Arbeiðsmann og stjóra. Fullveldisfólk og sambandsfólk. Kristin og heidningar. Stutt sagt, so eru tey sálarsjúku líka ymisk sum øll onnur. Tað, tey hava til felags, er, at sálarliga styrkin ikki var nóg mikil til at megna tey krøv, sum tilveran setti, ella sum tey seta sær sjálvum. Hjá teimum flestu sálarsjúku hendir tað einaferð ella nakrar fáar ferðir í lívinum at sálarstyrkin ikki slær til, men at tey vinna styrkina aftur, og hjá summum kann tað taka langa tíð. Hjá nøkrum tó so, at tey kanska ongantíð vinna fullu styrkina aftur. Tað kann so hava við sær, at tey ongantíð aftur megna at standa mát til tey krøv, sum tilveran setur, og skulu hava serliga hjálp at klára hesa. Tað er tó í grundini bara ein lítil partur av teimum sálarsjúku, sum hava hendan tørv.

Hetta eru tó tey, sum eru ringast fyri, og sum ljós serliga hevur verið kastað á seinastu árini. Tí, rætt er, at umráðandi er at geva sinninum gætur nú, men tað hevur seinastu árini verið givið meiri gætur enn kanska nakrantíð fyrr. Tað hevur verið tosað nógv um bústaðir til sálarsjúk og tann stóra tørv, sum er.

Onkur hevur nevnt fyri mær, at nú hevur verið tosað so nógv um hesar bústaðir, at fólk kanska byrja at troyttast av hesum tosinum. Tað eru nú meira enn tvey og eitt hálvt ár síðani at ein arbeiðsbólkur kom við síni frágreiðing og uppskoti um hetta, og frá fyrsta degi hava politikararnir verið sera positivir og vilja játta pengar til hetta. So nú mugu fólk væl halda, at trupulleikin er um at verða loystur. Men trúgvið tí ella latið vera. Í dag eru tað færri búpláss á stovnum fyri sálarsjúk, enn tá kjakið byrjaði fyri tveimum og einum hálvum ári síðani. Og hetta sjálvt um løgtingið hevur játtað tíggju milliónir krónur til endamálið. Búpláss eru niðurløgd og eingi eru komin í staðin. Rætt skal vera rætt. Eini hús eru keypt vesturi í Vágum, men tey standa og gálva tóm og koma at gera tað í mánaðir afturat. Í fjør fullu tvær og ein hálv millión aftur í landskassan, tí heilsumálaráðið ikki fekk brúkt tær. Í ár eru teir so farnir undir at brúka pengarnar, sum eru játtaðir til bústovn fyri sálarsjúk til onnur endamál, so teir ikki fella aftur í landskassan. Líka mikið hvussu góð endamál pengingurin verður brúktur til, so er talan um ein beinleiðis stuldur av pengum, sum eru játtaðir til sálarsjúk. Ætlanin er tó kanska møguligvís at keypa okkurt hús til sálarsjúk - um teir fáa tíð !

Eitt av málunum við at gera serlig búpláss, er at teir sjúklingar, sum eru liðugt viðgjørdir á Landssjúkrahúsinum, ikki skulu búgv har, men flyta út í samfelagið at búgva millum onnur. Hetta er ein hugburðarbroyting, sum er farin fram um allan vesturheimin seinastu árini, at tað er ein mannarættur at kunna fáa ein bústað úti í samfelagnum og at hesin rættur ikki verður virdur, um tað einasta, vit kunnu bjóða, er ein sjúkrasong og eitt náttborð. Serkunnleikin hevur víst á, at tað eru nøkur, sum hava serligan tørv, og hava mælt til at byggja ein serligan stovn onkrastaðni í Havn til hesi. Hesin er lagdur á ís, tí hann verður hildin at vera ov dýrur. Veit um, at samráðingar vóru við býráðið í Havn um at finna eitt øki at byggja hendan stovnin á, men at striltið gekk. Ja, so striltið, at tað endaði við, at hesin stovnurin, sum skuldi hjálpa fólki til annan bústað enn psykiatriska deild á Landssjúkrahúsinum, ja, hann ætlaðu menn av álvara at byggja, ja, í túninum á psykiatrisku deild. Her mugu fólk taka sær álvarsliga um reiggj og finna eitt brúkiligt byggiøki, áðrenn ætlanin verður tiðnað uppaftur - ongantíð ov skjótt, tí hesin stovnur er ein fyritreyt fyri at fáa glið á. So tað er at vóna, at fólk ikki troyttast, tí langt er eftir á mál enn, tá arbeitt verður eftir hæli.



*Tormóður Stórá heldur røðu á vaglinum.*



*Tveir luttakarar: t.v. Soffi Egholm, formaður í Sinnisbata og Jonhard Haraldsen.*

# Til minnis um Knút

Tann 3. oktober andaðist Knud Olsen, úr Havn, 74 ára gamal. Knút var sonur Hedvig og Johannes Juul Olsen, og vaks Knút upp úti á Reyni. Foreldrini hjá pápanum vóru Súsanna og Poul Olsen, sum vóru ættað av Velbastað, men fluttu til Nólsoyar. Ein pápabeiggi var mentamaðurin Tróndur Olsen. Mamma Knút var dóttir gamla Knút skómakaran og Isalinu, sum var systir til Dia og Djóna í Geil og Elspu Sloan. Hetta gjørdi okkum báðar til skyldmenn, og tá Knút var sera familjukærur, kendu vit okkum sum næstringar. Knút eigur eina eldri systir, Súsanna, sum býr í Havn. Tað var eisini allar dagar eitt sera inniligt samband millum systkini bæði.

Tað var kanska ikki so eyðkent fyri havnardreingir at fara til skips, tá farið var úr skúlanum. Men Knút var longu sum smádrongur sera bragdligur. Hann hevði sjóhug, og tá var besti møguleikin at sleppa sær við eini slupp á snørisveiði. Knút fór sum heilt ungur við "Gudrun Zoegu", har Des Egholm, systkinabarn Hedvig, var skipari.

Seinni sigldi Knút við "Streymoynni" og aftur seinni, vist í 1948, fór hann við "Nólsoyar Páll", sum tá var eitt av okkara flaggskipum. Skipari var Hansemann Isaksen. Tá var kreppa í Føroyum, og tað verður roknað sum eitt av okkara vinnuligum bakkøstum, at "Nólsoyar Páll" mátti fara av landinum aftur.

Knút var eisini á sildaveiðu í 1948 við "Silver Spray". Teir trolaðu eftir sild, fyrst undir Føroyum, síðan undir Íslandi og eftir tað í Norðsjónum. Men teir vóru sum eitt tað fyrsta skipið yvirhøvur á sildaveiðu við gørnum norðanfyri, og var hetta byrjanin til eitt týdningarmikið skeið í okkara fiskiveiðusøgu.

Teir høvdu 45 gørn og høvdu bert 8 setur. Veiðan var 60 tons, sum hevði verið nógv, um hon varð saltað í tunnur, sum seinni varð gjørt. Men sildin var avreidd til bræðingar í Kollafirði fyri 15 oy/kg, og hetta var ikki lønandi.

Knút var kokkur og góður kokkur. Skipari var John Joensen hjá Sterka Jakku.

### Gjørdist yvirmaður hjá Mærsk

Knút hevði nú sett sær fyri at halda fram á sjónum, men hann vildi víðari út enn at sigla við fiskiskipum. Hann fór tískil á stýrimansskúla í Havn. Tá bar ikki til at gerast skipsførari her, so hesa útbúgving tók hann á Fanø.

Stórt sæð alla restina av sínum arbeiðslívi arbeiddi hann hjá A. P. Møller. Eigil hjá Pól á Borð greiðir frá, at Knút var stýrimaður á fyrsta skipinum í reiðarínum, sum fór at nýta plattar. Hetta ljóðar kanska ikki av so nógvum í dag, men var eitt stórt framstig tá. Í staðin fyri at handfara hvørt kolli, bæði við lasting og lossing, skuldu tey nú bert eina ferð leggjast á ein platt, og so kundi vøran flytast í heilum líki aftur og fram á trukkum. Hetta var sera arbeiðssparandi.

Knút gjørdist eisini skipari í reiðarínum og fyrsta skip, hann var skipari á, var "Anna Mærsk".

### Gjørdist yvirmaður á landi

Í 1972 gjørdist Knút portcaptain hjá A. P. Møller í USA í San Fransisco/Oakland, sum var ein av teimum stóru havnunum hjá reiðarínum. Knút hevði ábyrgdina av avgreiðsluni av teimum skipum, sum komu higar, og tey vóru ikki so fá. Knút var tískil ein av varastjórunum hjá Mærsk í USA. Her arbeiddi Knút í 19 ár, til hann gjørdist pensjonistur.

Knút var ein framúr álitismaður, og hetta varð eisini virðismett av Mærsk Mc Kinney Møller sjálvum. Eg hitti harra Møller, tá hann var í Føroyum fyri nøkrum árum síðan. Tá mátti eg nýta høvi til at fortelja, at eg var í ætt við Knút. "Ja, han har været os en god mand", svaraði gamli aftur, sum annars ikki plagar at taka munnin ov fullan.

Sum sagt var Knút familjukærur. Hetta fekk eg eisini at sanna, tá eg í 1976 vitjaði tey eina viku í Californina. Tey bæði vóru so serstakliga blíð, og eg fekk eina uppliving fyri lívið. Vitjaði m.a. á víðagitnu fangaoynni Alcatraz.

### Beinasamur sum fáur

Knút var annars so serstakliga beinasamur. Hann himpraðist ikki við at gera alt tað, sum stóð í hansara makt at hjálpa øðrum. Sum greitt frá her í blaðnum doyði Dagbjartur Johansen seinast í august. Tá hann gjørdist sjúkur í 1995 umborð á skipi og mátti fara í land í USA og verða lagdur á sjúkrahús har, var ikki mark fyri, hvussu Knút og eisini sonur hansara, Johannes Juul, hjálptu uppá hann. Hetta verður framvegis virðismett í familjuni.

Knút var eitt stak gott umboð fyri Føroyar í útlondum. Hann hevði sínar føstu meiningar, og sum prestur segði: Hann kundi altíð siga sína meining um USA í Føroyum og um Føroyar í USA. Hann var sera áhugaður í politiskum viðurskiftum, og hevði eisini sínar greiðu meiningar um tey, um tað so var í Føroyum ella USA.



*Knút sum yvirmaður.*

### Datt niður í Mykinesi

Knút var við í flogvanlukkuni í 1970. Hann slapp hampiliga væl frá vanlukkuni. Men í hesum sambandi prógvaði hann eisini, at hann var ein skilamaður. Trupulleikin var, at teir vistu ikki, hvar teir vóru. Tað kundi eins væl vera í Vágum! Og tá myndugleikarnir fingu staðfest, at flogfarið var dottið niður í Mykinesi, vistu teir ikki, hvar í Mykinesi tað var. Dánjal J. Bærentsen, fyrrverandi djóralækni, var eisini við, og hann luttók virkin í at bjarga og hjálpa teimum, sum vóru skadd. Hann greiðir frá, at hann kendi als ikki Knút frammanundan. Men so einaferð sigur Knút: "Har er ein varði." Dánjal helt, at hetta mundi vera ein marknavarði. So fara Knút og Poul Grunnveit at kanna málið, og teir síggja fyrst ein annan og so ein triðja varða longur burturi. Og tá verður avrátt, at teir skuldu fara at royna at finna bygd ella fólk, so boð kundu latast um, hvat ið var hent. Teir báðir, Knút og Poul Grunnveit, fara so til gongu. Teir komu júst í túnið í Mykinesi, tá boð komu hagar um, at vanlukkan var hend, og at tey máttu fara at leita. Men tá kundu Poul og Knút greiða frá, hvar flogfarið var dottið niður, og hevur hetta gjørt sítt til, at hjálpin kundi koma skjótari fram.

Aftaná hevði Knút eina sera stóra umsorgan fyri teimum, sum ikki vóru sloppin so væl frá vanlukkuni sum hann sjálvur. Og hetta hevur skapt vinarløg, sum hava vart til hendan dag - og til sjálvan gravarbakkan.

### Náddu at hava gullbrúðleyp

Knút giftist við Mary Davidsen, sum er ættað av Toftum, og kundu tey hava gullbrúðleyp í fjør. Tey bæði riggaðu serstakliga væl saman, og Mary hevur verið Knúti ein framúr stuðul. Tey eiga børnini Hedvig, Niclas og Johannes Juul. Hedvig býr í Danmark, Niclas í Føroyum og Johannes Juul í USA. Abbasonurin, Knút Johan, hevur verið nógv hjá ommuni og abbanum í USA, og tað endaði við, at hann beint nú er giftur har yviri.

Aftaná at vera farin frá fluttu Mary og Knút til leiðina við Seattle. Her livdi Knút sum ein føroyingur. Hann hevði bát og royndi at rógva út. Men tey vildu aftur til Føroya, og tey høvdu vónað at kunna havt nøkur góð ár í Føroyum aftaná, at Knút var komin nakað til árs. Men Knút fekk Alsheimer-sjúkuna, og tað gekk skjótt afturá, og nú fekk hann frið.

At Knút var væl umtóktur sást við jarðarferðina. Havnarkirkja var fullsett av fólki, sum fylgdi honum.

Ærað veri minnið um Knút.

*Óli hjá Elisu systkinbarninum.*




*Knút og Mary*



*Tordur saman við gestum og búfólki.*



*Óluva Hammer, sum er búfólk, var ein av teimum, sum bar fram heilsan.*

# Tordur 20 ár í starvi

Mikudagin hin 1. oktober hevði Tordur Niclassen verið í starvi á Eysturoya Ellis- og Røktarheimi í 20 ár. Hetta varð markerað við eini hugnaligari samkomu seinnapartin hendan dagin.

Her var nógv fólk komið saman, og nógv varð gjørt fyri at gera løtuna hátíðarliga, og eydnaðist hetta eisini sera væl.

Tordur hevur annars skapað søgu við at gerast fyrsti mannligi sjúkrasystirin í Føroyum. Fyri hetta man hann hava fingið nógvar glósur gjøgnum tíðirnar.

Tað er heldur eingin ivi um, at tað var eitt rætt val at seta Tord sum leiðara fyri tað nýggja ellisheimið fyri 20 árum síðan. Her tosar tann, sum skrivar hesar reglur, út frá egnum royndum og kemur her javnan sum avvarðandi til búfólk. Tað er eingin ivi um, at tað hevur sera stóran týdning at hava trivnað á einum slíkum heimi og so tað, at tey avvarðandi kunnu føla seg trygg. Hetta er eydnast sera væl, og er hetta eisini teimum altíð fittu og blíðu starvsfókunum fyri at takka. Tey fara við viðskiftafólkunum, sum um tað vóru teirra egnu næstringar, og hetta eru tey avvarðandi sera takksom fyri.

Sum politikkari so hevur Tordur eisini sína hugsan um eldra- og røktarpolitikk, og tað er av avgerandi týdningi fyri politiska støðutakan, at ein kann hava beinleiðis royndir á økinum.

Tordur er heldur ikki bangin fyri at royna nýggjar leiðir. Hann hevur í farloyvi verið í Eysturgrønlandi, og hevur hetta givið eitt serligt innlit í, hvussu viðurskifti kunnu vera aðrastaðni.

Tordur er ættaður úr Sørvági, men fyri meira enn 20 árum síðani giftist hann við listakvinnuni Sigrun G. Andreassen av Eiði, og tey búsettust á Eiði. Tey eiga børnini Mariu, Heina og Pætur.

Nú er spakin settur í fyri at víðka ellisheimið, og er hetta sera vælkomið. Hetta vil geva Tordi og hansara manning nýggjar avbjóðingar.

Hesum verður eisini ynskt tillukku við.



*Hesar gomlu eru góð umboð fyri tey, sum hava hildið samfelagnum uppi: Frá vinstru Olina Lervig, Sanna Danielsen, Lorensa Nielsen, Helga Hansen og Katrina á Fløtum.*



*Prestar og kommunupolitikkarar í Eysturoy vóru eisini til staðar.*



*Marin og Andreas á Skipanesi, sum eftir eitt langt og virkið lív nú búleikast á Ellisheiminum.*



*Starvsfólkið saman við leiðaranum.*



*Frá v. Millum fryntligu starvsfólkini eru Marita og Sigrun.*

# Rækjuskip og "Arctic Viking"

Tað er lætt at geva øllum viðmerkjarum rætt í tí, at tað er sera óheppið, at skip fara at flagga út fyri at sleppa bíligari í hýru til lágløntar eystureuropearar. Hetta er tað, sum verður kallað "sosial dumping", sum er ein ein hóttan ímóti løntakarum í londum við einum øðrum og hægri lønarlag.

Tað er eisini merkiligt, at eigararnir hava fingið sær milliónir í vinningsbýti árið eftir, at teir eru saneraðir.

Men at fara at viðgera menninar aftanfyri hetta skip sum brotsmenn er tó eitt langt lop. Hesir menn hava hóast alt ikki framt nakar lógarbrot.

Tann grundleggjandi trupulleikin í hesum máli er tað politiska atgerðarloysið í hesum málinum.

Vinnan hevur jú fleiri ferðir lagt upp til eina politiska viðgerð og støðutakan til støðuna hjá rækjuflotanum.

Fyrr í ár fekk landsstýrið eina uppgerð av ískoytinum frá føroysku rækjuvinnini til samfelagsbúskapin í Føroyum, sum felagið Rækjuskip hevur latið gjørt, og sum FF hevur verið við til at gjalda.

Her sást svart uppá hvítt, hvussu stóran týdning hesin flotin hevur fyri føroyska samfelagið. Her er talan um hundraðtals arbeiðspláss, bæði á sjógvi og landi, og árliga hundrað tals milliónir av inntøkum til føroyska samfelagið.

Tað hevur leingi gingið sjón fyri søgn, at hesin partur av flotanum er í eini slíkari trongstøðu, at vandi er fyri, at hann púra kemur at hvørva. Og mótsett virkjum á landi, sum ongan veg fara, hóast tey fara á húsagang, so kunnu skipini lættliga hvørva av landinum sum døgg fyri sól.

Men so vítt tað kann síggjast, er ikki rætt hond frá síðu fyri at geva hesum trupulleika eina politiska viðgerð.

Tað tykist, sum at spurningurin fellur og stendur við politikkinum hjá landsstýrinum, at vinnan má klára seg sjálv, og at tað almenna ikki á nakran hátt skal koma neyðstaddari vinnu til hjálpar uttan mun til, hvussu álvarslig støðan er.

Sigast kann, at hetta er eitt sjónarmið, sum sjálvsagt prinsipielt er rætt. Og tað er eisini lætt at handheva tað, meðan alt gongur væl, sum tað hevur gjørt seinastu árini.

Vit vita væl, at studningur kann vera av tí ónda, tá hann verður skeivt brúktur. Men her kunnu vit lættliga blíva klók av skaða, og vit vita væl, hvussu studningur ikki skal veitast.

Men hinvegin má tað vera ein uppgáva hjá landsmyndugleikunum at taka støðuna í álvara í málum sum hesum, so tað - í hvussu er í fyrsta umfari - kann staðfestast, hvat skal til í hesum máli. Síðan eigur støða at takast til, hvussu kreppan í rækjuflotanum kann loysast.

Og her kunnu vit vísa á, at almenni politikkurin, um ikki at lata studning, ikki er galdandi á øllum økjum. Vit kunnu bert minna á FAS-skipanina, har endamálið er at varðveita føroyska farmaflotan á føroyskum hondum og enntá at økja um hann. Men hetta verður júst gjørt við almennum studningi, nevniliga afturbering av 28% av lønarútreiðslunum. Hetta er ikki eingang ein fyribilsskipan, sum kanska er tað einasta, sum skal til fyri rækjuflotan, men ein permanent skipan, sum er ætlað at vera varandi.



Vit geva enntá ríkasta manni í danska kongaríkinum almennan studning gjøgnum DIS-skipanina. Tað er tískil als ikki talan um ein greiðan og konsekventan politikk á hesum øki.

Vit halda ikki, at tað er rættur politikkur hjá almennum myndugleikum at skúgva eitt slíkt álvarsmál frá sær, sum tað tykist at verða gjørt.

Tað kundi verið nakað hjá fjølmiðlunum at sett ljóskastaran á, men hetta verður sjálvsagt ikki gjørt.

Hvussu ósaklig tíðindatænastan annars hevur verið í hesum máli sást í Degi í Viku, har tað varð lagt reiðarínum til last, at tað ikki hevði tikið ímóti einum keypstilboði uppá 50 mill. kr., sum bæði hevði goldið landskassaveðhaldið aftur og givið 16 mill. til partaeigararnar.

Tað var í hvussu er avgerandi fyri, um reiðaríið kundi lastast, um tilboðið var úr Føroyum ella ikki. Tí var tilboðið úr Føroyum, kundi kanska nakað verið um tað, tí tá kundi skipið verið verandi í Føroyum. Men var tilboðið útlendskt, var tað væl skiljandi, at teir ikki vildu selja. Tað vildi í hvussu er kunnað bøtt eitt sindur um umdømið hjá reiðaríinum, at teir - hóðast støðuna - ikki vildu sleppa endanum, og at teir kortini tóku samfelagslig atlit í ein ávísan mun. Tí varð tikið við einum slíkum tilboði, so var skipið í hvussu er farið úr Føroyum með alla. Men at upplýsa hetta kundi "oyðilagt" tíðindaflutningin í hesum máli. Tí ráddi um hjá hesum sambært lóg óhefta fjølmiðli ikki at geva hesa sera týdningarmiklu upplýsing. Tað skal sigast, at sjónvarpið hevur verið í óndari trúgv í hesum máli. Tað kann ikki vera nakað dulsmál fyri upplýst tíðindafólk, at tað er sera sannlíkt, at eitt slíkt tilboð ikki hevði komið úr Føroyum.

Felagsstjórnin í Fiskimannafelagnum samtykti annars á fundi tann 17. juni at heita á landsstýrið um at taka neyðug stig at bjarga rækjuflotanum. Vit vónaðu, at hetta varð tikið í álvara, so tað kundi sleppast undan teirri vanlukku fyri samfelagið, um ein heil vinna hvørvur.

FF fer at viðgera hvat tað kann gera fyri at forða útflagging av fiskiskipum, og eisini av rækjuskipum.

Vit vilja mæla til, at fiskimálaráðið ger tað sama. Tað kundi kanna støðuna hjá flotanum. Og eisni úlitini framyvir. Kanska er onkur glotti at hóma. Síðan kundi verið sett upp tey stig sum kundu verið tikin, eisini av tí almenna, fyri at varðveita hesa vinnu.

Tað vildi verið politikkur.

## Hetlendsk fiskiskip verða upphøgd í stóran stíl

So hvørt sum tann bretski feskfiskaflotin verður skorin niður, økist tørvurin hjá bretsku virkjunum at fáa útlendska ráværu at virka.

Shetland Seafood News skrivar, at ein fjórðingur av hetlendska hvítfiskaflotanum verður sendur til upphøggingar. Hetta kemur í kjalarvørrinum á stóru kvotaniðurskurðunum, sum allur bretski veiðiflotin hevur verið úti fyri í ár. Samstundis sum kvoturnar vóru skornar niður, bjóðaðu myndugleikarnir eisini upphøggingarstuðul til skipaeigarararnar. Nú hava so 7 av teimum 28 hetlendsku feskfiskatrolarunum givið skarvin yvir og tikið av tilboðnum um upphøggingarstuðul.

Hetta kemur at hava stóra ávirkan á okkurt av útjaðaraøkjunum í Hetlandi. Hvørva arbeiðsplássini, so hvørva fólk eisini.

Virkini á landi umhugsa eisini framtíðina. Ein virkiseigari sigur, at fyri at hava nakað at gera á virkinum, mugu teir longu nú innflyta fisk úr Føroyum, men at hann heldur hevði ynskt at keypt feskan fisk frá lokalum fiskimonnum.

# VI KONDEMNERER M/S VESTERVEG

## og selger følgende brukt utstyr:

Furuno CSH82 Sonar 1998 model,
Simrad SP270 Sonar 1998 model,
Kaiyo Doppler Logg 2000 model,
Scanmar Catch System 92 model,
Decca 3cm Radar 93 model,
Kelvin Hughes 10CM 97 model,
Azimuth GyroTrack 2000 model,
EMV notkran 97 model,
Triplex notkran 90 model,
el. mobbåt davit,
EMV dekkskran 2T 8M med vinch 96 model,
Volvo TAMD162C 350 kva 96 model,
+ masse mer.

Vi kjøper også fartøy for hugging

**Ring De norske huggerne**
Tlf.: 0047 38045984 · Fax: 0047 38043365 · Mob.: 0047 40217576
0047 40226310 · e-mail:skipsbrukt@broadpark.no


# Føroyingar eru allastaðni: Gongdin hjá laksi úr sjónum til hann verður keyptur í handlinum í USA

FF-blaðið hevur kunnað havt nógvar góðar søgur gjøgnum tíðirnar. Men ferðin til Alaska, sum er umrødd í seinasta blað, hevur gjørt okkum førar fyri at koma við einari rættiliga einastandandi frásøgn.

Vit kunnu nevniliga fylgja laksi frá tí, hann er veiddur í sjógnum út fyri Alaska, og til hann mestsum stendur á borðinum í amerikanskum heimum. Og sum ikki einaferð, so er tað ein føroyingur, sum hevur eina lyklastøðu í hesi frásøgn.

Men at søgan letur seg siga, hevur eisini nakað við hepna tilvild at gera.

Søgan byrjar við, at vit á IFISH ráðstevnuni í Alaska hitta Juliu, sum er ein av teimum, sum hjálpir til á stevnuni. Men hon er eisini fiskimaður. Hon er sera blíð og fyrikomandi og greiðir villiga frá sínum fiskiskapi og fiskiskapi annars har á leiðini. Hon lænir okkum tær myndir, sum vit brúka til frásøgnina.

Tað næsta stigið var at hyggja eftir tí fiskiídnaði, sum var í býnum. Her gingu vit framvið einum virki, sum kallast Seafood Producer's Cooperative, stytt SPC. Hetta navnið ljóðaði áhugavert, tí tað smakkaði eitt sindur av "sosialismu", ið ikki verður roknað at vera serliga væl umtókt í USA.

Men Julia fekk gjørt eina avtalu um vitjan á virkinum, og tá fekst at vita, at Julia sjálv var ein partaeigari í virkinum og tískil eisini avreiðir har. Her fekst tískil ein áhugaverd vitjan.

Longu áðrenn farið var heimanífrá var avrátt at vitja Selectfish í Seattle í USA, beint sunnan fyri markið til Canada. Annar av eigarunum her - og stjóri - er vágbingurin Eyðfinn Tausen. Hetta er eitt flakavirki, sum sendir lidnu vøruna beinleiðis til forbrúkaran. Tað vísti eg, at Eyðfinn keypir stóran part av síni rávøru úr Alaska, og ein stóran part av hesi júst frá SPC, hagar Julia avreiðir sína veiði.

Hervið er talan um eitt samanhangandi samband frá veiði, til vøran er frammi hjá brúkaranum. Samstundis er grundarlag fyri einari góðari lýsing av fiskivinnuviðurskiftunum í USA, sum verður gjørd í trimum greinum um veiði, virkis- og sølulið.

Greinirnar eru á síðu 13, 15 og 20.


**SELIR TÚ**

**skipa- ella bátaútgerð?**

So er FF-blaðið einasti holl boðberin, sum fer umborð á skipini – umvegis reiðarini – hvønn útgávudag.

Gerið eina skilagóða lýsingaravtalu við okkum.

Tlf: 31 15 69
Fax: 31 57 69
T-post: ff-blad@post.olivant.fo



# Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- ***avrúsan og viðgerð***
- ***einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)***
- ***samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)***
- ***eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi***

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75






Við okkurt um 25.000 ymiskum vørum á hyllunum, stendur landsins største goymsla av eykalutum til taks hjá føroyska flotanum.
Aftanfyri stendur eitt samtak av trimum føroyskum skipasmiðjum og einum mekaniskum verkstaði, ið hevur meir enn seksti ára royndir innan veitingar til skipaflotan – alt frá smærri umvælingum og viðlíkahaldi til um- og nýbygging av skipum.

Góðkendir tænastuveitarar av:
Wärtsilä
Deutz-MWM
Scania & Valmet
Callesen
Ulstein Brattvaag
ABB-Turbochargers
Desmi pumpum

stephanssons hús

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
Tlf. +298 31 11 55
Fax +298 31 11 25
e-mail: info@faroeyard.fo

**P/F Skipasmiðjan á Skála**
Tlf. +298 44 11 55
Fax +298 31 44 25
e-mail: skala@faroeyard.fo

**Vestmanna Skipasmiðja**
Tlf. +298 42 40 10
Fax +298 42 40 05

**Runavíkar Mekaniski Verkstaður**
Tlf. +298 44 70 36
Fax +298 44 78 34

**www.faroeyard.fo**

# Fiskamarknaðurin skal vera meiri sjónligur

Fyri at binda okkum sjálvi, soleiðis at viljin til at kunna meiri um tað, sum gongur fyri seg á Fiskamarknaðinum, skal gerast til veruleika, verður nú ein roynd gjørd at skriva í FF blaðið



*John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya*

Fiskamarknaður Føroya, FMF, hevur ein ikki heilt lítlan leiklut í føroyska samfelagnum. Leikluturin er stórur, tá ið tað snýr seg um peningaupphæddirnar, sum fara ígjøgnum felagið. Leikluturin er stórur, tá ið tað snýr seg um talið á samstarvsfeløgum, og leikluturin er eisini stórur, tá ið tað hevur við starvsfólk og deildir at gera.

Tølini tala verður ofta tikið til. Í fjør var umsetningurin hjá FMF omanfyri sjey hundrað milliónir krónur. Talið á teimum, sum mest sum hvørja viku keypa og selja, liggur um tvey hundrað, og samlaða starvsfólkatalið í øllum liðum í felagnum liggur onkra staðni millum 60 og 70.

Uppgávurnar hjá Fiskamarknaði Føroya kunnu flokkast upp í tveir partar. Annar er at halda uppboðssølu av fiski, bæði gólvuppboðssølu og telefonuppboðssølu.

Hin uppgávan er arbeiðið á landingarmiðstøðunum. FMF hevur tvær landingarmiðstøðir. Onnur er her á Toftum, og hin er í Klaksvík. Harafturat hevur FMF samstarvsavtalur við tvær aðrar landingamiðstøðir. Onnur er Sp/f Fløgan í Vági, og hin er Landingarmiðstøðin í Sørvági. Samarbeiðið fevnir um, at FMF selur fiskin, sum verður lagdur upp á hesum báðum landingarmiðstøðunum. FMF samstarvar eisini við aðrar landingarmiðstøðir og virkir kring landið.

Tá ið virksemið er stórt, og tá ið tað hevur stóran týdning fyri fiskivinnuna og harvið alt tað føroyska samfelagið, er tað týdningarmikið, at almenningurin veit um FMF og um tað, sum gongur fyri seg í felagnum og í sambandi við felagið. Um kunningin og innlitið í arbeiðið í FMF og tað, sum hevur við felagið at gera, ikki er nóg góð, so er møguleikin góður fyri, at misskiljingar taka seg upp, sum ikki tæna nøkrum. Fyri okkum hevur tað alstóran týdning, at viðskiftafólkini hava álit á FMF, og at álitið sæst aftur í arbeiðnum, sum vit útinna fyri kundarnar.

Á FMF ásanna vit, at vit higartil ikki hava røkt kunninga uppgávuna um okkum sjálvi og tað, sum vit takast við, nóg væl. Hetta kundi gott havt hægri prioritet, enn tað higartil hevur havt. Tað ætla vit okkum at gera nakað við nú. Tí er tað, at vit eru farin í samstarv við FF blaðið. Ætlanin er, at vit eina ferð um mánaðin skulu framleiða tilfar til tvær síður í FF blaðnum. Vit vóna, at tað fer at bera til at lýsa virksemið á FMF og viðurskifti, sum hava við FMF at gera, á fjøltáttaðan hátt.

Í fyrstu atløgu ætla vit at royna hetta tiltak í teir tríggjar mánaðirnar, sum eru eftir av hesum árinum. So fara vit at eftirmeta, um hetta er ein góður máti at koma nærri málinum, sum í hesum sambandi er, at FMF og virksemið, sum hevur við FMF at gera, skal vera sjónligari, enn tað higartil hevur verið.

*John Nielsen, stjóri á FMF*

# Tíðindi frá Fiskamarknaðinum:

# Kaffifundur á Fiskamarknaðinum

## Ætlanin at bjóða kundunum til kaffiprát av og á varð mikudagin í síðstu viku fyrstu ferð veruleiki



*Frá vinstru síggja vit Dánjal Jákup Vilhelm, reiðara á Fugltúgvuni og Thomas Nygaard, Hilmar Joensen, stjóri á Faroe Freshfishr, Johannus Olsen, stjóri á Snodd og reiðari á Eysturingi og Sigmund, Auðunn Konráðsson, formaður í MÚ.*



*Frá vinstru síggja vit John Nielsen, stjóra á FMF, Tummas Pauli Olsen, virkisleiðara á Fiskavirkið í Gøtu, og Jógvan Gregersen stjóri á Vaðhorn Seafood.*

Yrkadagurin á Fiskamarknaðinum er eyðkendur av, at tað er samband við eina rúgvu av viðskiftafólkum. Ørindini hjá summum eru at keypa, og onnur vilja selja. Felags fyri nógv av viðskiftafólkunum er, at tey hava nógv um oyruni, og at tey rættiliga sjáldan, og summi so at siga ongantíð, vitja á Fiskamarknaðinum. Samskiftið hjá teimum við Fiskamarknaðin gongur fyri seg ígjøgnum telefon, telefaks og teldupost.

Nú í eina tíð hevur á Fiskamarknaðinum verið tosað um, at tað ivaleyst hevði verið gagnligt, at keyparar og seljarar av og á og samstundis fingu høvi at vitja á Fiskamarknaðinum, og at hesar vitjanirnar vóru á dagsskránni hjá summum av starvsfólkunum á Fiskamarknaðinum, soleiðis at tey ikki vóru upptikin av øðrum uppgávum ta løtuna, tá ið viðskiftafólkini vitjaðu.

Fyrsta royndin av hesum slagnum var mikudagin 8. oktober. Skotbráðið var ikki so langt frá tí, at innbjóðingin fór avstað og til henda dagin, men kortini vóru eini 10-15 møtt til henda kaffifundin, sum tað verður rópt.

John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaðinum, sigur seg vera væl nøgdan við hesa fyrstu royndina av hesum slagnum, og hann roknar við, at tað verður bjóðað aftur til fundar eina ferð seinni í ár. Tá vónar hann, at tey fara at síggja bæði tey, sum hesa ferð møttu, og so eisini aðrar kundar.

- Vit høvdu ikki nakra ávísa dagsskrá fyri fundin. Vit drukku kaffi saman, og so fall prátið, soleiðis sum innihaldið í gerandisdegnum og áhugin og skyldurnar hjá teimum, ið vóru møtt, lagaði tað. Tað vóru bæði keyparar og seljarar til staðar, so tað var grundarlag fyri at práta um nógvar lutir og viðurskifti, og tað varð eisini gjørt.

*Hvat fingu tit burturúr?*

- Tað ber ikki til soleiðis ítøkiliga at siga, hvat kemur burturúr einum sovornum kaffipráti. Talan er um óformelt forum uttan dagsskrá, og tí verður talan sjálvandi ongantíð um nakrar niðurstøður og samtyktir. Tað, sum hevur týdning, er at práta og lurta. Tað fremur fatanina fyri viðurskiftunum hjá teimum, sum røkja ymsar partar av fiskivinnuni, og tað kann bara vera gott. At sovorðnar samkomur, ella hvat vit kalla tað, eru gagnligar, sigur seg sjálvt, staðfestir John Nielsen.

Á Fiskamarknaðinum vilja tey ikki binda seg og siga heilt víst, nær næsta tiltakið av hesum slagnum verður. Tað kann altíð okkurt spæla inn. Men tey hava tosað um, at tað hevði kanska verið eina roynd vert at havt sovorðnar fundir t. d. fyrsta mikumorgunin í hvørjum mánað.

Tá ið kaffiprátið var liðugt, vóru luttakararnir við á uppboðssøluni. Teir plaga vanliga at taka lut yvir telefonina, men henda dagin vóru teir í húsinum, har sølurnar fara fram. Onkur av luttakarunum hevði ikki so ofta áður verið hjástaddur i egen person, tá ið tað verður selt.





*Vinstru megin síggja vit Ludvík Justinusen, innkeypara á Føroya Fiskavirking og t.h. Marner Joensen, á Sonny Seafood.*

# Altjóða rembingar trýsta prísirnar

## Føroyski fiskamarknaðurin er bara finna í altjóða høpinum, har lági dollarin og viknaður amerikanskur búskapur og stóra hýsuútboðið úr Íslandi og Noregi og ikki minst kinesisk framleiðsla tykjast trýsta føroysku prísirnar



Hóast fiskivinnan er stór og týdningarmikil í Føroyum, so er føroysk fiskivinna einki serliga stór og týdningarmikil í altjóða høpi. Tá ið keyparar og seljarar mikudagin hittust á Toftum, var tað sjálvandi skjótt, at prátið fall inn á fiskaprísirnar. Toskaprísurin er framvegis hampuliga góður - ov høgur halda summi - meðan hýsuprísurin tað seinasta árið hevur verið væl lægri, enn hann var frammanundan. Tað er eingin ivi um, at gongdin á altjóða fiskamarknaðinum og í altjóða búskapinum sum heild eiga sín stóra lut í, hvussu umstøðurnar hjá føroysku fiskivinnuni laga seg.

Í sambandi við hetta prátið um fiskaprísir og altjóða viðurskiftini vísir Símun Jacobsen, ið hevur ábyrgdina av søluni hjá Føroya Fiskavirking, á fleiri viðurskifti í altjóða fiskamarknaðinum, ið hava verið við til at trýsta prísirnar.

Símun heldur, at ógvusliga uppgongdin fyri nøkrum árum síðani hevur kastað skuggar yvir prísirnar, sum hava verið hesa seinastu tíðina. At fiskaprísirnir vóru so høgir, hevði við sær, at talið á teimum, sum valdu at skifta fiskadøgurðan út við okkurt annað, eitt nú høsnarungar og annað bíligt kjøt, vaks. Harvið minkaði eftirspurningurin nógv, prísirnir lækkaðu, og tað gjørdu teir meiri, enn tað kanska varð roknað við. Lági prísurin eigur at hava við sær, at fleiri gerast áhugað í at eta fisk. Tað eigur aftur at hava við sær, at prísirnir hækka. Men so eru tað onnur viðurskifti, sum spæla inn. Viðurskifti, sum føroyingar ikki kunnu gera nakað við, men sum ávirka umstøðurnar hjá føroyskari fiskivinnu.

### Toskurin

Toskin hava føroyingar saltað og fryst. Prísurin á toski hevur verið so mikið høgur, at teir, sum frysta, ikki hava fingið tað at hanga saman. Toskurin verður so at siga bara saltaður. Kundarnir eru í katólsku miðalhavslondunum.

- Tað verður vanliga sagt, at eyðkennið fyri hesar kundarnar er, at teir ganga høgt upp í katólsku læruna um ávís tíðarskeið at halda seg frá kjøti. Tá eta teir fisk. Tað verður eisini sagt, at talan fyri tað mesta er um eldri fólk, sum eru fíggjarliga væl fyri. Higartil hava tey orkað at rinda lutfalsliga høga prísin fyri saltaða toskin.

### Hýsan

Prísirnir á hýsu hava verið lágir, og tað tykjast ikki vera serliga bjørt útlit fyri prísgongdini. Hýsan verður fyri ein stóran part virkað til frysta vøru, sum er ætlað til bretska og amerikanska marknaðin. Her hevur útboðið verið rættulig stórt. Skotar, íslendingar og norðmenn hava havt vaksandi nøgdir av smáari hýsu at selja, og tað er einki, sum bendir á, at nøgdirnar fara at minka.

- Tað verður nú tosað um kvotur fyri næsta ár. Íslendingar og norðmenn tosa ikki um at lækka kvoturnar. Heldur verður tosað um at seta kvoturnar upp. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað kann roknast við, at útboðið fer at vaksa, og tað boðar ikki frá betri prísum, um eftirspurningurin ikki fer at kvinka uppeftir. Spurningurin er altíð, hvussu nógv prísurin skal niður, áðrenn eftirspurningurin aftur økist, og tað harvið kann roknast við, at prísirnir aftur fara at hækka.

### Stóri útheimurin

Í fjølmiðlunum verður ofta tosað um trupulleikarnar, sum stóru búskaparnir í heiminum dragast við. Tá ið tað verður tosað um trupulleikarnar hjá Bush og amerikanarunum og hjá Gerhard Schröder og týskarunum, eru tað sjálvandi tíðindi uttan úr heimi. Men hetta eru viðurskifti, sum hava stóran týdning fyri vánirnar, hvat kann fáast fyri føroyskan fisk:

- Vit selja nógv til USA, Onglands og Týsklands. At amerikanski búskapurin hevur verið veikur, hevur havt við sær, at dollarin er viknaður í mun til evruna. Eingilska pundið fylgir meiri dollaranum, enn tað fylgir evruni. Tí hevur keypiorkan hjá bretum eisini verið fallandi. Týskarar nýta evruna. Út frá tí kundi hugsast, at teir høvdu størri orku at keypa, men teir hava síðani samanrenningina ímillum

# Miðalprísurin fallin næstan 13 prosent

## Trý tey fyrstu fjórðingsárini í ár var nøgdin, sum fór um sølurnar hjá FMF, 5 prosent minni enn í fjør, og prísirnir vóru næstan 13 prosent lægri



*Sammett við í fjør hava nøgdirnar verið fimm prosent minni, meðan prísirnir eru lækkaðir næstan 13 prosent*

At fiskaprísirnir ikki hava verið teir somu seinastu tíðina, sum teir vóru frammanundan, er ein veruleiki, sum eisini sæst aftur á tølunum hjá Fiskamarknaði Føroya fyri níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár.

Nú skulu tøl, og serliga miðaltøl, takast við nógvum fyrivarnum, men tey geva kortini ábending um, hvussu gongdin hevur verið og er.

Níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár var miðal prísurin fyri kilo á tí, sum varð selt um uppboðssølurnar hjá Fiskamarknaðinum 10,58 krónur. Í fjør var miðalprísurin fyri kilo níggju teir fyrstu mánaðirnar 12,13 krónur. Talan er um eina príslækking í miðal upp á 12,8 prosent.

Samlaðu nøgdirnar vóru eitt sindur størri teir fyrstu níggju mánaðirnar í fjør, enn tær vóru níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár. Í ár vóru frá januar og til og við september seld 38.555 tons um uppboðssølurnar hjá FMF. Í fjør var talið fyri sama tíðarskeiðið 40. 672 tons. Sølunøgdin í trimum teimum fyrstu fjórðingsárunum í ár var altso 2.117 tons ella 5 prosent minni í ár, enn hon var í fjør.

Um tølini fyri september í fjør og í ár verða sammett, so sæst at nøgdirnar henda mánaðin í fjør vóru væl størri, enn tær vóru í ár, og at miðalprísurin í fjør var hægri enn í ár, men ikki so nógv hægri, sum miðalprísurin fyri teir fyrstu níggju mánaðirnar hevur verið.

Í september í ár vórðu seld 4.065 tons um uppboðssølurnar hjá FMF. Í fjør var talið 5.172 tons ella 21 prosent hægri. Miðalprísurin í september í fjør var 11,43 krónur, og í ár var hann 10,26 krónur. Tað vil við øðrum orðum siga, at miðal kiloprísurin í september í fjør var 10,2 prosent hægri, enn hann var í september í ár.

Hon nýtist ikki at vera so

STÓR

Nei, lýsingin nýtist ikki at vera so stór fyri at síggjast - og tá kostar hon heldur ikki so nógv.

Gerið eina lýsingaravtalu við FF-blaðið og sparið 50%

Telefon: 31 15 69
ff-blad@post.olivant.fo

gamla Eysturtýskland og Vesturtýskland havt stórar búskaparligar trupulleikar og stórt arbeiðsloysi, sum hava havt við sær, at keypiorkan har hevur verið minkandi.

Eitt annað, sum ikki virkar rætta vegin, er, at norska krónan er veikari, enn tann danska krónan er. Hetta hevur verið norskum fiskaútflutningi til fyrimunar, tá ið sammett verður við føroyskan útflutning.

Harafturat eru tað onnur viðurskifti, sum hesa seinastu tíðina hava spælt inn. Eitt er kanadiski fiskurin á europeiska marknaðinum, og eitt annað er kinesisk framleiðsla. Í tí fyrra førinum er talan um avleiðing av, at amerikanski búskapurin ikki er so væl fyri.

- Kanadiskur toskur plagar at hava latínamerikanska klippfiskamarknaðin sum stóran avtakara. Argentinski búskapurin smokkaði heilt saman fyri nøkrum árum síðani, og niðurgongdini í USA hevur sum heild ávirkað latínamerikanska marknaðin skeiva vegin hjá kanadiarunum. Tað hevur aftur havt við sær, at kanadiarar hava sýnt europeiska marknaðinum stóran áhuga. At evran er sterk sammett við dollaran ber við sær, at teir fáa meiri burturúr at selja henda vegin. Tí kappast kanadiskur toskur við fiskasløg, sum upsa og onnur fiskasløg, sum vit vanliga rokna fyri at vera bílig. Men hetta mugu vit rokna við er ein støða, sum fer at broytast aftur, tá ið amerikanski búskapurin fer at koma fyri seg aftur, heldur Símun Jacobsen.

At upsaprísurin hevur verið trýstur niður, kemst av stóra útboðnum av alaska pollock frá amerikonskum og russiskum trolarum og frá haki og hake frá New Zealandi. Tá ið dollarin lækkar, samstundis sum nógv verður fiskað av hesum fiskasløgunum, virkar tað við tvífaldari styrki, tí hesi fiskasløgini verða keypt og seld í dollarum. Hann er yvir eitt ikki so ógvuliga langt tíðarskeið fallin ur 9,00 krónum og niður i 6,30 krónur. So tað sigur seg sjálvt, at tað kennist dygt.

Tá ið tað snýr seg um kinesisku framleiðsluna, sum í alt størri nøgdum floymir inn á bæði europeiska og amerikanska marknaðin, er støðan ein onnur. Kinesararnir keypa eitt nú russiskan fisk. Orsaka av ógvuliga lágu lønunum kunnu framleiðsluútreiðslurnar hjá kinesarunum á ongan hátt sammetast við tær hjá okkum. Tí eru teir førir fyri at selja so nógvar ferðir bíligari, enn vit gera.

Útlitini tykjast altso ikki serliga góð fyri prísgongdini á føroyskum fiski?

- Tað eru fleiri viðurskifti, sum í løtuni bera á skeiva borðið. Men tað skal so lítið til, áðrenn tað kann broytast. Kinesisku kappingini fara vit ikki at sleppa undan. Men vit mugu rokna við, at amerikanski búskapurin fer at batnað. Nær tað verður ber ikki til at siga, men tað fer at kennast aftur, tá ið tað kemur so langt. Tá ið dollarin og pundið fara at hækka, fara vánirnar fyri betri prísum at batna, og so mugu vit rokna við, at týski búskapurin fer at reisa seg aftur. Í Týsklandi búgva 80 milliónir, í Bretlandi 55 og í USA upp ímóti 300 milliónum. Tá ið hesi fara at hava betri búskaparligar umstøður, enn tey hava í løtuni, fer tað eisini at síggjast aftur í eftirspurninginum eftir fiski, og harvið fara fiskaprísirnir vónandi at kvinka uppeftir aftur. Men tað kann ikki roknast við teimum prísunum, sum vóru fyri nøkrum árum síðani, heldur Símun Jacobsen, sølumaður hjá Føroya Fiskavirking.

| Útróður: | Kg | Kr/kg | +/- |
|---|---|---|---|
| Toskur 1. | 18.905 | 22,94 | 0,68 |
| Toskur 2. | 23.255 | 21,14 | 1,29 |
| Toskur 3. | 141.372 | 15,46 | 2,46 |
| Toskur 4. | 209.611 | 11,75 | 0,88 |
| Toskur 5. | 46.384 | 7,96 | 0,87 |
| **Línuskip** | | | |
| Toskur 1. | 131.663 | 23,16 | -0,07 |
| Toskur 2. | 128.079 | 21,67 | 0,06 |
| Toskur 3. | 116.038 | 17,14 | 1,83 |
| Toskur 4. | 54.157 | 11,84 | 1,01 |
| Toskur 5. | 3.710 | 6,25 | 0,49 |
| **Trol o.a.** | | | |
| Toskur 1. | 25.499 | 22,95 | 0,11 |
| Toskur 2. | 16.303 | 21,89 | 0,47 |
| Toskur 3. | 55.893 | 15,69 | 2,07 |
| Toskur 4. | 102.024 | 12,24 | 0,81 |
| Toskur 5. | 12.646 | 8,84 | 0,81 |




*Stabbamyndirnar høgrumegin vísa gongdina mánaða fyri mánaða teir seinastu seks mánaðarnar fyri tey ymisku fiskasløgini. Sum tað sæst eru flestu prísirnir kvinkaðir upp eftir í september.* ►►►

| Útróður: | Kg | Kr/kg | +/- |
|---|---|---|---|
| Hýsa 1. | 56.873 | 11,30 | 2,04 |
| Hýsa 2. | 152.207 | 8,53 | 0,76 |
| Hýsa 3. | 248.881 | 5,43 | 0,51 |
| Hýsa 4. | 8.738 | 1,84 | -0,36 |
| **Línuskip** | | | |
| Hýsa 1. | 55.198 | 9,56 | 0,70 |
| Hýsa 2. | 193.496 | 8,56 | 0,71 |
| Hýsa 3. | 63.479 | 6,75 | 1,78 |
| Hýsa 4. | 2.506 | 3,05 | 1,06 |
| **Trol o.a.** | | | |
| Hýsa 1. | 46.082 | 10,53 | 1,46 |
| Hýsa 2. | 140.575 | 8,77 | 0,85 |
| Hýsa 3. | 180.508 | 5,87 | 0,55 |
| Hýsa 4. | 7.710 | 2,88 | -0,37 |




| | Kg | Kr/kg | +/- |
|---|---|---|---|
| Toskur | 1.145.619 | 15,88 | 1,49 |
| Hýsa | 1.226.885 | 7,46 | 0,80 |
| Brosma | 253.411 | 6,22 | -0,20 |
| Longa | 165.443 | 11,05 | -0,54 |
| Blálonga | 33.522 | 6,52 | 0,93 |
| Upsi | 731.046 | 2,78 | 0,73 |
| Kongafiskur | 87.772 | 5,85 | 0,57 |
| Havtaska | 105.633 | 22,27 | 6,85 |
| Hvítingur | 10.421 | 4,61 | 0,01 |
| Kalvi | 19.053 | 28,09 | 1,23 |
| Reysprøka | 19.736 | 13,82 | -0,22 |
| Tunga | 34.908 | 26,53 | 6,63 |
| Svartkalvi | 185.811 | 20,35 | 4,19 |
| Annar ráfiskur | 45.565 | 5,76 | -0,21 |




*Hesar talvurnar vísa prísirnar í september. Seinasti teigur (+/-) vísir broytingar í kg.prísum í mun til í august.*

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein



Tann 27. september vóru + 4,2 stig og nógvur vindur við ælingi av suðri. “Marcus S” var inni eftir plattum, sum teir brúka í lastini. Teir høvdu gott 400 tons inni, og hann fór út aftur beinanvegin, so skjótt alt var komið umborð.

Dagin eftir kom “Polar Nanok” inn. Teir brutu túr av, tí okkurt er galið við øðrum spælinum; teir høvdu fulla last, men máttu bíða við at landa, tí áarføri var og øll ferðsla - bæði í luftini og á sjónum - varð avlýst vegna veður.

Mikkjalsmessudag landaði “Sisimiut” í Nuuk gott og væl 730 tons av svartkalva. Túrurin vardi í tveir mánaðar.

Tann 30. fór “Polar Nanok” til Nuuk at orðna spælið, og um kvøldið kom “Natarnaq” bara inn um oyggjarnar við einum reparatøri, sum skuldi í land. “Lómur” fór nýggjan túr hetta sama kvøldið. Teir komu inn at skifta ein mann, og so løgdu teir tað, sum teir høvdu inni, upp - knapt 30 tons. “Louise L” legði knapt 18 tons av jákupsskel upp sama dag. Teir høvdu roynt ein knappan mánaða. Í dag var “Akamalik” inni í Nuuk og landaði, hetta var annar túrurin síðani 20. august.

4. oktober vóru minus 0,8 stig og stilli, men hvítt í bakka. Tað kom í gjárskvøldið, tá tað var av ringasta veðri, og um náttina var kolandi stormur. Hann skifti millum sunnan og útsynning við kavaælingi. Allir teir smærru trolararnir og krabbabátarnir komu inn um morgunin dagin fyri.

Eg frætti herfyri, at ein ógvuliga stór grind var funnin ímillum Adamik og Napasoq, sum liggur sunnan fyri Manitsok. Eg tosaði við ein føroying, sum býr í Manitsok, og hann greiddi frá, at hann hevði fingið at vita, at grindin var stór - út ímóti 1.000 hval. Teir fingu rikið nakað inn í eina vík og fingu um 100 hval burturúr, og so góvust teir. Hetta var fyri um trimum vikum síðani, og teir vóru her norðuri og seldu hvølju, sum er ein delikatessa hjá okkum, sum dáma hvølju.

Eg havi havt samband um e-mail við teir báðar skiparnar á íslendska trolaranum “Ingimundur”, sum fiskaði rækjur til Royal Greenland í fjør. Flósi, sum annar teirra eitur, fór niður við einum skipi, sum varð selt úr Íslandi til arabarar. Hann hevði eina riflu við at forsvara skip og manning, um teir fingu vitjan av sjórænarum, men tað gekk alt fínt og uttan trupulleikar. Men hann fekk trupulleikar, tá hann skuldi heim aftur við flúgvaranum, tí hann hevði ikki kunnað myndugleikarnar, at hann hevði eina riflu í kuffertinum. Hann varð tikin og settur í gegllið, har hann sat, til teir íslendsku myndugleikarnir komu uppí. Hann slapp úr geglinum nakað seinni, men passið varð tikið frá honum, meðan málið varð kannað. Herfyri fekk eg so e-mail frá Flósa, at hann var komin heim aftur í øllum góðum og var farin at skriva eina bók um ta tíð, hann sat í fongsli hjá arabarunum.

7. oktober - stilt og - 2,8 stig. Ein krabbabátur legði knapt 5 tons upp av livandi krabba. Teir høvdu drigið um 2.300 teinar. “Aldan”, spanski krabbabáturin”, kom inn hendan dagin, tí teir høvdu fingið okkurt um skrúvuna og máttu larra seg inn við 1,5-2 míla ferð. Ein kavari fór niður og tók tað sindrið, sum var, av. “Aldan” hevði landað í Nuuk tann 26. september; teir løgdu 30 tons upp eftir 50 døgum. Teir framleiða umborð. Túrin frammanundan hesum løgdu teir 80 tons upp eftir færri fiskidøgum, so tað er heldur svingandi við krabbaveiðini. Tað var stuttligt at síggja manningina á “Alduni”, teir keyptu eina rúgvu av toski frá smábátunum, og so gingu teir við posum á rygginum og bóru umborð, so teir høvdu nakað at salta til jóla. Har fór heilt nógv umborð, tað er vist so, at nógv tos er um “bacalao” har umborð, nú teir loystu frá landi. Í fjør góvust teir 24. november, tá skipið fór til Spanien. Hvussu verður í ár, vitsti skiparin, sum er úr Klaksvík, ikki. Teir hava fiskað næstan tað sama í ár sum í fjør.

Krabbafiskaríið er við at fáa eina keðiliga lagnu. Sitat úr Sermitsak skrivði 3. oktober, at 4 krabbaskip eru undir konkursviðgerð. Tað eru skipini, sum eitt “anpartsselskab” eigur, og tey eru helst kend av fleiri føroyingum: “Arctic Wolf”, “Arctic Pioner”, “Arctic Moon” og “Arctic Star”. Hvussu stór skuldin er, er ikki kent, men Sparbanken Rogaland hevur kravt minst 150 milliónir goldnar, sigur kurator í konkursviðgerðini, Peter Schriver, frá Nuna Advokaterne við Sermitsiak.

“Akamalik” er í Eysturgrønlandi, men tað var ikki tað stóra fiskaríið. Teir skulu inn at landa 27. oktober.

Tann 10. oktober vóru minus 2,6 stig og stilli. Ein krabbabátur kom inn dagin fyri, og teir høvdu gott 3 tons av livandi krabba. Teir smærru bátarnir fáa ymiskt í mongd; onkran dag er brúkiligt fiskarí, og aðrar dagar fáa teir lítið og einki. Sisimiut Food er byrjað at taka ímóti toski frá smábátum. Teir salta fiskin. Smábátarnir fáa væl av fiski; teir brúka toskagørn. Tað stendur væl av toski í munnanum inn til Sisimiut, og tað er betri fiskur nú enn í summar. Nógvar jollur fiska tosk til krabbaagn. Krabbabátarnir brúka helst blandað agn, tosk og hegguslokk í sama tein.






*Hetta er “Akamalik”, sum Linjohn Christiansen og Jógvan Trondesen eru skiparar á. Hann er bygdur í Vigo í Spania í 2001 og er 76,80 m langur og 14,60 m breiður. Kokkurin umborð, Joen Petur Petersen, hevur sent okkum myndirnar.*

## Tíðindi til skip við telduposti

Fiskimannafelagið roynir støðugt at bøta um tíðindaflutningin til skip og fiskimenn. Eitt stórt framstig var, at vit fingu heimasíðu við tíðindum úr FF-blaðnum. Her ber lættliga til at fáa tíðindini á hesi adr.: www.fiskimannafelag.fo/skip

Men nú ber eisini til at senda tíðindini beinleiðis við telduposti. Tá skulu tey bert skrivast út á printara.

Tað, sum hevur størstan týdning, tá skipini skulu hava tíðindi, er, at skipanin er einføld og skjót. Og tað sær út sum, at tað hevur eydnast okkum at fáa eina skipan at virka, sum er bæði einføld og skjót.

Í hesum sambandi kunnu vit kanska taka brot úr meting og royndum hjá skipara á rækjuskipi. Hann hevur m.a. skrivað: FF-bladid kom væl fram, tað tók 1 min 42 sek, at taka niður, onki roks við at pakka blaðið út. Inn á mailin db-klikka, sídani maximer aftur db-klikka, sídani print. Lidugt arbeidi.

So hetta riggaði bara heilt væl, stóra tøkk fyri ómakin. Vónandi kunnu tit halda áfram við hesum tiltaki í framtíðini. Hetta er gott lesistoff.

Hetta er ein tænasta, sum vit veita ókeypis. Vit senda longu til nógv skip. Men er onkur, sum ikki fær blaðið á hendan hátt, er bert at siga okkum frá á tlf. 31 15 69, fax. 31 87 69 ella við at senda ein teldupost til: fo-fisk@post.olivant.fo




## Símun Askham var B36-ari

Í teimum seinastu tveimum bløðunum hava vit havt eina samrøðu við 102 ára gomlu Onnu Askham. Onkur misskljing er komin í, enntá misskiljing sum “summi” meta vera ófyrigeviliga. Sagt varð, at Símun Askham var HB-ari. Hetta er so skeivt, sum tað kann vera. Hann var nevniliga B36-ari við lív og sál!



## Samrøða við Eliesar í Fugloy

# Tá var lív á útoyggj

**Í tveimum teimum seinastu bløðunum hava vit havt samrøðu við 102 ára gomlu Onnu Askham, sum hevur upplivað alla seinastu øld sum havnarfólk. Hesa ferð frætta vit um lívið hjá tí skjótt 98 ára gamla Eliesar Sørensen, sum kemur frá ytstu útoyggj, nevniliga Kirkju. Teirra barn- og ungdómur hevur verið sera ymiskur, men bæði hava upplivað broytingar, sum tey ungu í dag neyvan skilja.**



Eliesar í dag, knappliga 98 ára gamal.

**At taka úr blaðnum**

**Síðurnar 11, 12, 17 og 18 kunnu takast úr blaðnum**

Tá vit í summar vóru í Klaksvík, fóru vit inn á gólvið hjá tí 97 ára gamla Eliesar Sørensen. Hann er ikki heilt ókendur fyri almenninginum. Fleiri ferðir hava hann og beiggjarnir, Mourits, føddur 1908, og Pætur Franklin, føddur í 1910, verið í sjónvarpinum. Eina ferð heilsaðu allir tríggir sum gamlir íslandsfiskimenn uppá íslendska forsetan, tá hann var í Føroyum á vitjan. Felags fyri teir var, at teir vóru allir raskir og skilagóðir.

Hetta er ikki minst galdandi fyri Eliesar. Hann býr heima hjá sær sjálvum enn og klárar seg við heimahjálp eina ferð um dagin. Hann er fastur møtigestur fleiri ferðir um vikuna í Betesda, og sagt verður um hann, at hann er fyrstur at reisa seg, tá samkoman skal standa uppi. Hvørt hóskvøld er hann til andakt uppi í sambýlinum, har hansara "lítlubeiggjar", báðir í 90-unum, búgva. Hann fylgir eisini við í tí, sum gongur fyri seg í samfelagnum. Tá útróður er, fer hann norð á Kósina at vita, hvussu hesin dagur hevur roynst. Ein søga er um, hvussu væl hann minnist. Tað var eitt kjak um, hvørt ein kona var 90 ella 91 ár. Tá segði Eliesar: "Hatta kann eg siga tykkum, tí eg minnist, tá hon varð fødd!"

Abbadótturin loddaði dýpið, um hann vildi vera við til at gera eina samrøðu, og hetta var so gamaní. Tað vísti seg beinanvegin, sum ofta er í Føroyum, at vit vóru ikki heilt frammandir fyri hvørjum øðrum. Vit hava nevniliga helst hitst, enntá í Keypmannahavn í 1946, tá hann, sum skrivar hesar reglur, var 3 ára gamal. Sum greitt verður frá seinni, kom Eliesar til Keypmannahavnar at søkja sær heilsubót. Her leitaði hann sær til brøðrasamkomuna í býnum, har nógvir føroyingar annars komu, og her var hann inni hjá foreldrunum hjá undirritaða, sum búi í íbúð í sama bygningini sum brøðrasamkoman, og tey høvdu umsjón við hølunum. Har hittust vit fyrstu ferð.

Eliesar er føddur 23. november 1905 á Kirkju. Tey vóru átta systkin. Av teimum liva umrøddu tríggir beiggjar eftir. Serliga av áhuga hjá havnarfólki kann vera, at elsti beiggi hansara var Zacharias Sørensen, f. 1894, sum í eitt mannaminni var skúlastjóri og deknur í Havn, og sum búði í skúlastjórahúsunum í Gr. Kambansgøtu. Meðan Zacharias gjørdist landkrabbi, blivu allir hinir beiggjarnir fiskimenn.



Hetta er abbi Eliesar, Zacharias Michelsen, ið var ug-næmingur í Havn.

Pápin var Søren Pram Zachariassen. Mamman, Sunneva Eliassen, var úr Kelduhúsunum í Hattarvík. Tað kann verða nevnt her, at tá Eliesar og hansara systkin komu at eita Sørensen, so var hetta eftir gamla navngevingarháttinum, tá børnini fingu eftirnavn eftir fornavninum á pápanum við -sen skoytt uppí. Hesin navngevingarháttur hevur verið nýttur longri í Norðoyggjum enn aðrastaðni í landinum.

### Abbin fekk ug

Abbin á Kirkju var lærarin Zacharias Michelsen. Fyri at búgva seg til starvið hevði hann verið eina tíð á Viðareiði hjá Sørensen presti, og í Havn hevði hann eisini lært m.a. hjá tí kenda skúlavininum, prestinum Christian Pram Gad. Tað var fyri at heiðra hesar menn, at hann kallaða ein son, pápa Eliesar, fyri Søren Pram. Hetta er tískil søgan aftanfyri, at tað framvegis eru fleiri í Føroyum, ið kallast Søren Pram Sørensen.

Her kann verða skoytt uppí, at Zacharias er umrøddur í bókini "Tórshavnar Skúlasøga". Tað einasta fráfaringarprógv, sum er funnið, er hansara, og hann fær heilt framúr ummæli. Allar lærugreinir hevur hann kláráð til udmærket godt, og síðan verður sagt:

*Indbemeldte Zacharias Michelsen, der saaledes i tre Aar har nydt undervisning i Thorshavn Skole, har i denne Tid vist sig som en udmærket sædelig Dicipel.*

*Hans Forstands Evner kan henregnes til de meget gode; man har derfor været meget tilfreds med hans Skolegang, og da han nu har fuldendt samme, anbefales han paa det varmeste og ledsages ved afskeden med de bedste ønsker om en blid og hældig fremtid.*

*Thorshavn Skole, den 20de Maii 1829.*

*C. Pram Gad*
*J. G. Effersøe*

Sagt verður eisini, at Zakarias var lærari í Fugloy frá 1834-49. Hann byrjaði 20 ára gamal, og tá var hann bæði lærari og deknur, og var hann einsamallur í húsi við mammuni, Ada Zachariasdatter, sum tá var 60 ára gomul. Zakarias gavst í 1849, einamest tí at illviljin var so stórur ímóti skúlanum, og tað gekk so illa at fáa lønina. Hon var bert 1 mørk um árið, sum J. Símun Hansen roknar úti til at vera kr. 15,51. Men fyri hesar pengar fekst í 1840 knøpp ein gyllin í jørð.

Zakarias legði ikki lærarastarvið heilt frá sær, sjálvt um hann ikki helt skúla. Børn gingu av og á til hansara at lesa, og eitt skifti um 1870 gjørdi hann nógv við lærarastarvið. Hann doyði í 1878.



Foreldrini hjá Elisar, Søren og Sunneva.

Sigast kann í stuttum, at ein ættargrein hjá Zakarias gjørdist allir teir kendu Zachariassen, sum eru kendir um alt landið, serliga fyri teirra mentanarliga og politiska virksemi.

### Tveir handlar

Tað fyrsta, Eliesar minnist, vóru 27 hús á Kirkju. Hann minnist ikki rættiliga fólkatalið, men sambært J. Símun Hansen lá tað um 100 í 1890, og longu í 1921 er fólkatalið komið uppá umleið 150 fyri síðan at minka aftur eftir kríggið.

Meðan tað í dag er lítið og einki virksemi í oynni, so var hetta ikki galdandi tá. Tað vóru tveir handlar á Kirkju, og sum vanligt var tá, keyptu og virkaðu teir fisk. Annan handilin hevði pápi Eliesar, Søren Pram Zachariassen.

Hann handlaði fyri Vágsbotnshandilin. Eliesar minnist enn bátarnar hjá handlinum "Eli" og "Surprice". Teir komu við vøru úr Havn og tóku fisk inn aftur til Havnar. Ein av teimum, sum sigldu við, var Hanus í Smiðjustovu, og hann kom Eliesar at kenna, eftir at hann var farin at sigla út frá Havnini. Tá kom Eliesar eisini at kenna nógvar útróðrarmenn í Havn.

Síðan hendi tað, at Vágsbotnshandilin fór fallit. Eftir hetta fór Søren at handla fyri Jørgen Bech og Sønner. Men hendan fyritøkan fór eisini fallit, og kostaði hetta alt pápanum nógvan pening. Síðan fór Søren Pram at handla sjálvur.

Tað var sum sagt eisini ein annar handil í bygdini, og hann var hjá Gullak Matras. Teir flaktu og saltaðu. Í handlinum hjá Søren Pram var ikki neyðugt at biðja fólk til arbeiðis. Tey vóru nógv fólk í húsi, og eftir tørvi máttu øll í húsunum hjálpa til.

Um veturin róðu teir út við fýra áttamannaførum. Um summarið róðu bert smærri bátar út. Tá vóru teir flestu menninir burtur til skips. Tað vóru sera ring lendingarviðurskifti á Kirkju. Men allir hjálptu



Eliesar á ungum árum.

Framhald á næstu síðu

hvørjum øðrum, og hetta var esini neyðugt.

Tá fiskurin varð hagreiddur, kom alt av fiskinum til sættis sum t.d. livurin, sum í dag als ikki verður tikin. Hon varð koyrd í tunnur. Og Eliesar minnist, at tá pápin flakti, tók hann sunnmagan burtur sohvørt. Sunnmagin varð turkaður og víst nýttur til lím. Hann varð spentur á brettir, sum so vórðu sett upp at turka. Onkuntíð turkaðu teir inni. Annars minnist Eliesar ikki til, at nógv varð gjørt við fiskaturking á Kirkju.

### Lítið av jarðarbrúki

Kirkja var ognarbygd. Har vóru bert tvey smá kongsfesti. Annað var hálva triðju og hitt hálva mørk. So jørðin hevur verið smábýtt. Tað var sjálvsagt neyðugt at hava kúgv, men hjá nógvum var so smábýtt, at tey máttu vera tvey hús um eina kúgv.

Fuglur hevði eisini nakað av týdningi, men neyvan meira enn til húsbrúks.

Eliesar er frá eini tíð, tá skógvarnir vóru húðaskógvar úr neytaskinni. Teir vórðu brúktir til alt brúk, og tá teir vóru slitnir øðru megin, vórðu teir klossaðir, t.v.s. teir vórðu vendir. Vanliga var tað uppgávan hjá pápanum at seyma húðaskógvar. Rotuskógvar úr seyðaskinni vórðu eisini brúktir, men hetta var til innandura-nýtslu og til børn.

Fólk høvdu svartaskógvar, men hetta var bert til sunnudagsnýtslu, og tá farið varð í kirkju ella líknandi.

Annars vaks Eliesar upp hjá sínum ógiftu pápasystkjum, Eliasi og Malenu, í húsunum har abbin, Zacharias, hevði búð. Sonurin, Líggjas (í Bø), er eisini uppkallaður eftir teimum báðum. Her inni búði eisini omman Elisabeth.

### Andaligt lív og mentan

Tað var nógv andaligt lív á Kirkju og annars á Fugloynni. Brøðrasamkoman kom tíðliga hagar, og møtisalur varð bygdur. Hann varð bygdur av Tróndi Simonsen, sum m.a. var pápi Esmar Simonsen, hvørs synir hava bilasølu við navninum á pápanum í Kambsdali. Salurin varð málaður av Andrew Sloan, sum annars plagdi at dvølja har úti. Av øðrum, sum komu, vóru Victor Danielsen og Jens Klæmint Isaksen. Ein lokalur talari var Jógvan Lydersen. Her komu nógv fólk til møti, og fólk gingu úr Hattarvík á møti. Men nú er so lítið fólk eftir, at salurin verður ikki brúktur regluliga.

So merkiliga tað ljóðar, var eingin kirkja á Kirkju í heili 100 ár, frá 1832 til 1933. Støðan var so vánalig á Kirkju fyrst í 19. øld, at avrátt varð at flyta kirkjuna til Hattarvíkar, m.a. við teirri grundgeving, at tað vóru ikki skikkað fólk á Kirkju at varða av kirkjuni. Tískil varð lestur lisin í skúlanum, tá Eliesar minnist. Tá prestur kom, var gudstænasta við altargongd í Hattarvík, so hagar varð farið til altars.

Tað var eisini annað upplýsandi virksemi. Eliesar minnist, at tey gingu í ávís hús at fáa søgur, og hevur hetta verið eitt slag av kvøldsetum. Tá postur kom, var fragd at hoyra læraran lesa úr teimum nýkomnu bløðunum. Men pápin fekk eisini bunkar av bløðum frá Zakariasi, sum var lærari í Havn, og var hetta spennandi lesnaður. Pápin helt eitt danskt blað, sum kallaðist Ugens Nyheder. Har vóru eisini andaksstykki, sum hann las hvønn sunnudag.

Tað var ikki einsligt at búgva á slíkari oyggj. Kirkja var nevniliga trettandabygd, og tá var lív í bygdini. Eliesar minnist bæði sundamenn, viðingar og svínoyingar koma higar á Trettanda. Nógv varð dansað, men bert føroyskan dans. Tá vitjað varð millum bygdinirnar á oynni, varð fylgt á leið, tá fólk fóru heimaftur. Annars letur Eliesar væl at sambandinum millum bygdirnar á Fugloynni. Serliga ungdómurin kom nógv saman, og tað eru ikki heilt fá hjúnaløg, sum hava verið millum fólk úr báðum bygdunum.

Vanligt var hjá fólki á Kirkju at at halda 2. jóladag í Hattarvík. Á Trettanda vóru tað tey á Kirkju, sum vóru vertir fyri teimum í Hattarvík.

### Av oynni at skera torv

Uppgávurnar vóru nógvar í eini slíkari bygd. Ein var at fáa brenni til vega, og hetta var torv. Men torvið í Fugloynni var ringt, so tað var ikki annað at gera enn at skera torv á Svínoynni. Hagar varð róð yvir við báti, og tá torvið skuldi fáast til høldar, varð tað flutt við báti yvir á Kirkju. Mannagongdin, tá tey skóru torv, var tann, at tá skipsmenninir komu aftur eftir fyrsta túrin, fóru teir undir at skera torv. Vanliga varð skorið og "borið burtur" sama dag.



*Kirkja í 1920 - uttan kirkju.*



*Roytingarkonur á Kirkju.*

Hetta merkir, at hvørjar tvær torvur vórðu lagdar soleiðis, at onnur lá omaná hina tvørturum. Soleiðis lá torvið í tvær vikur. Síðan var farið í miðskiftu. Tá vórðu 5-6 torvur settar upp ímóti hvørji aðrari upp í ein spíss. Aftaná einar tvær vikur aftur var torvið vanliga turt. Síðan varð tað borið oman á bakkan og lagt í lutir, t.v.s. lagt saman í eina rúgvu. Var torvið turt, bilaði ikki, um regn kom í tað.

Tá vóru skipsmenninir farnir avstað aftur, so tað mátti bíða, til teir komu aftur at fáa torvið til høldar. Tá varð farið at føra torvið yvir um fjørðin. Torvið varð borið í leypi oman á bakkan og lagt í bátin. Tað vóru báðir skutirnir, sum vórðu fyltir. Síðan varð róð yvir á Kirkju, har torvið aftur varð fylt í leypar og borið niðan í bygdina. Hetta var - sum vera man - sera strígg ið. Seinni varð torvið koyrt í sekkir, og lætti hetta nógv um.

Torv var vandamikil last, og nógvir torvbátar eru farnir gjøgnum tíðirnar. Men hóast Fugloyarfjørður er vandafull leið, hendi eingin vanlukka.

Tað var sjálvsagt nakað serligt at fara av oynni at skera torv. Hetta gav eitt serligt samband við svínoyingar. Tað var ikki langt heim í bygdina. Stundum varð gist og eisini varð farið til handils í Svínoy. Svínoyingar hjálptu eisini viðhvørt til hjá fugloyingum.

Fugloyingar rindaðu eitt gjald uppá 10 oyru fyri leypin til bóndurnar í Svínoy. Hvørt húski skar vanliga 40-50 leypar, so kostnaðurin var einar 5 kr. Jukim Olsen, ættaður úr Svínoy, minnist til, at fugloyingar plagdu at koma at avrokna eina ferð árliga. Hetta var ein hugnaløtu, har tað fekst eitt gott prát yvir einum drekkamunni. Sagt verður, at svínoyingar við somu skipan høvdu



*Skúlin á Kirkju um 1925. Lærararnir vóru Símun Mikal Zachariassen og Karolina Matras.*

Framhald á síðu 17

## Fiskikvinnan í Alaska:

# Fer til skips við allari familjuni!

Fiskivinnan hevur stóran týdning fyri Alaska. Staturin er jú ótrúliga stórur, 1,5 mill. ferkilometrar ella umleið 100 ferðir so stórur sum Føroyar. Strondin er umleið 76.000 km. Fólkatalið er bert 600.000, so her er nógv landaøki í part. Hetta merkir, at her eru nógv smá fiskivinnusamfeløg, og tí kann Alaska fyri ein stóran part sammetast við Føroyar.

Her er eisini ein hópur av fiski og nógv ymisk fiskasløg. Øll hava vit hoyrt um Alaska pollock, ið er heimsins størsti fiskastovnur og tí eisini ein hóttan móti okkara prísi á upsa, sum er nakað sama fiskaslag. Men tað er nú ikki hetta fiskaslagið, sum hevur tann størsta týdningin fyri fiskimenn í Alaska. Hesin fiskur verður veiddur til havs av verksmiðjutrolarum og fyri ein stóran part av skipum, sum ikki hoyra heima í Alaska. Víst skulu skipini vera amerikansk, í hvussu er á pappírinum, men hetta forðar ikki útlendskum áhugamálum at vera við og eisini at hava stóra ávirkan. Og her spæla japanarar ein stóran leiklut. Høvuðsstøðin fyri hesi skip er annars Seattle í statinum Washington.

Eins og Føroyar kann Alaska gera krav uppá at hava eitt reint hav. Í bløðunum har yviri var júst nú ein grein, har greitt varð frá kanningum av innihaldinum av kvikksilvuri í fiskinum í Alaska sjógvi. Úrslitið var, at allur fiskur har á leiðini er reinur og kann trygt verða etin. Tí er hann ein tann sunnasti matur, sum yvirhøvur finst. Í hvussu er har á leiðini.

Vit hava við vitjanini í Sitka, sum er umrødd í



*Og her síggja vit sonin.*

seinasta blað, fingið møguleika fyri at lýsa fiskiveiði og -vinnu í einum "typiskan" fiskivinnubýi í Alaska, sum minnir nógv um Klaksvík. Sitka hevur umleið 9.000 íbúgvar, og havnin er full av meira at kalla útróðrarbátum. Teir tykjast at vera fleiri hundrað í tali, og tað sama er galdandi fyri talið á fiskimonnum. Onkur metti, at teir vóru út móti 1.000, og sigur hetta, at fiskiskapur hevur ein alt avgerandi týdning fyri býin.

Tað eru tríggir reiðskapir, sum eru av týdningi her. Teir eru lína, nót, gørn og so "trolling" ella dyrging. Týdningarmestu fiskasløgini eru laksur, kalvi og "blackcod" ella "svartur toskur", sum tó ikki er í ætt við okkara tosk.

### Til skips við Julie

Vit fingu serligt samband við Julie Butler Dogget, sum var hjálparfólk á trygdarráðstevnuni. Tá vit spurdu hana, um hon kundi vísa á onkran fiskimann, sum vit kundu spyrja um fiskiskap, vísti hon á seg sjálva. Vit fara tískil at lýsa hana sum eina ímynd av einum fiskimanni í Alaska. Hon hevur eina serstaka bakgrund. Hon er fødd á New York leiðini, og á hennara visitkorti stendur hon til at vera listafotografur og listafólk. Hon giftist, tá hon var 45 ár gomul, og tá tey ikki høvdu nakað barn, ættleiddu tey ein tá nýggju ára gamlan drong úr Bulgaria. Hann er so um 14 ára gamal í dag. At ættleiða eitt so stórt barn er ikki bert sum at siga tað, men hetta riggar bara væl.

Julia hevur so ein, sum vit vildu kalla tað, útróðrarbát, sum er einar 50 føtur. Hetta er mest vanliga bátastøddin har á leiðini. Tað, sum eisini er eyðkent, er, at fiskiveiða fyri ein stóran part er familjukent, soleiðis at øll í húskinum eru við. Hervið kann eisini sigast, at her er talan um eina serliga "útróðrarmentan", sum vit vildu sagt tað.



*Hetta er byrjanin á okkara frásøgn um laksin, frá tí hann kemur úr sjónum, og til hann endar í forrætningini - við føroyingi sum millumliði. Á lúnningini síggja vit húkarnar, sum verða brúktir.*

Hetta merkir, at t.d. á sumri er øll familjan við til fiskarí. Hetta umfatar bæði mann, son og so hund og kettu. Sonurin hevur síni skúlating við, og hann kann so lesa uppá, tá stundir eru.

### "Trolling" ella dyrging

Tað, sum kann sigast at vera høvuðsveiðan hjá Julie, er "trolling" ella dyrging eftir laksi, sum er mest nýtti veiðiháttur júst á hesum leiðum. Trolling er dyrging við fýra dergum. Tað eru einir 20 húkar á hvørjari dorg. Tískil eru 80 húkar tilsamans við metalbeitu, og tað eru 6 metur millum húkarnar. So hvørja ferð laksur tekur, verður drigið upp, eins og vit kenna tað við dyrging. Tað er so smart, at ein klokka ringir, tá tað bítur á!

Tað verður viðurkent, at trolling er ein sera burðardyggur veiðiháttur, og hann gevur eisini ta bestu góðskuna og harvið besta prísin. Laksarnir koma umborð ein og ein, og teir verða hagreiddir fyrsta floks. Teir verða reinsaðir so hvørt og ísaðir ein og ein. Og tað eru hesir laksar, sum kunnu fara beinleiðis á eitt borð, sum um teir vóru beint komnir úr sjónum. Tað, at tað kann bera til at fáa so nógv betri prís við hesi viðgerðini, ger, at tað ikki er neyðugt við teimum stóru nøgdunum. 50 laksar um dagin er brúkilig veiða.

Ein túrur kann hægst vara 5 dagar, men Julie syrgir fyri at avreiða hvønn dag. Hon kann gott liggja úti í meira enn ein mánaða, men tá kemur bátur frá virkinum út á fiskileiðirnar og tekur fiskin.



*Her hava tey fingið ein rimmar kalva. Hann er fingin á línu. Hetta er maður Juliu, Tim.*



*Her verður "trollað".*



Listaframsýning var eisini á ráðstevnuni, har lívið hjá fiskimonnum varð lýst. Her hava teir fingið ein stóran kalva.



Hendan tekningin vísir, hvussu "trolling" gongur fyri seg.

Hetta gevur sum sagt ein betri prís enn annars verður latin, uml. 1 dollara fyri pundið, sum svarar nøkulunda til 15 kr. kg. Men tað er ikki langt síðan, at prísurin var 3-4 dollarar, og hetta merkir, at fiskimenn her hava merkt somu ella størri príslækking á laksi, sum hevur skapað kreppuna í okkara egnu laksavinnu.

Avmarkingin í laksaveiðini liggur fyrst og fremst í tali av loyvum, sum verða givin. Men tað eru fimm sløg av laksi, har summi verða roknað fyri at vera meira hótt enn onnur. Á teimum hóttu sløgunum er heildarkvota. Tá hon er rokkin, er neyðugt at sleppa tí, sum tá verður veitt av hesum sløgum, avstað aftur. Men roknað verður við, at fyri laks er hetta ikki stórur trupulleiki, so hann kann setast livandi útaftur.

## Kvotur og keyp av kvotum

Um veturin eru tað summir, sum halda áfram við trolling og sum frysta veiðina umborð. Men Julie leggur tá um til at fiska kalva við línu og at koma heim at avreiða hvønn dag. Her verður framvegis egnt við hond, og prísurin á kalva er góður. Tað er kalvakvota til hvønn einstakan bát, og kvotan er sett eftir miðalveiðini árini frammanundan, kvotan varð ásett. Julia hevði ikki so nógv søgulig rættindi, so hon má keypa sær kalvakvotu, og hon er dýr. Kalvaprísurin er annars 3 dollarar fyri pundið, ella 40-45 kr. kg, men at keypa eina kalvakvotu kostar 11 dollarar. Tískil skal fiskast í fleiri ár fyri at fáa keypspeningin inn aftur. Men Julie sigur, at hetta er at meta sum eina langtíðaríløgu, sum uppá sikt skal loysa seg.

## Nøgdir við reguleringsskipanina

Tað virkaði annars, sum at fiskimenn her vóru hampiliga væl nøgdur við teirra reguleringsskipan. Men hon er sera neyv. Fyri hvørja veiði eru gjørdar vegleiðingar, sum kunnu vera omanfyri 200 síður hvør, so tað er nógv at lesa uppá hjá fiskimonnum.

Tað er annars onkur annar áhugaverdur fiskiskapur í Sitka. Ein er várveiðan eftir sild, tá hon kemur inn at gýta. Her er tað eins og lodnan í Barentshavinum. Tað ræður um at veiða hana, áðrenn hon hevur gýtt. Tá kann hon seljast fyri nógvan pening til Japan. Sum tað skilst, er tað eitt rættiligt kupp at fáa eitt slíkt loyvi. Tey kunnu seljast fyri 400.000 dollarar. Tá er hetta bert ein veiða, sum varar fáar dagar. Avreiðingarprísurin liggur um kr. 10 pr. kg. Veiðan fer fram við nót.

Hendan veiðan gevur tó ikki nógv av sær á landi. Sildin verður heilfryst og síðan send til Korea at virka. Har eru lønirnar nevniliga nógv lægri enn í Alaska.

So er ein onnur áhugaverd veiða. Hon er at kava eftir sjópylsum, sum viðgjørd kann seljast fyri nógvan pening í fjareystri. Summi hava tað bert sum ítrív, men vit frættu um fulltíðar fiskimann, sum kundi vinna einar 100.000 dollarar árliga i hesi veiði.

## Kunnu veiða til egna nýtslu

Í aðrari grein fara vit at viðgera støðuna í Kanada. Men tað er ein áhugaverdur munur millum reglurnar í Kanada og Alaska. Í Kanada er tað revsivert so mikið sum at veiða sær ein tosk til egnan døgurða. Men í Alaska er tað lógarfest, at tað skal bera til hjá einum og hvørjum at veiða sær fisk til egið forbrúk. Víst telja reglurnar her 168 síður, men tað er eingin ivi um, at her er talan um skipaði viðurskifti. Tað er óneyðugt at siga, at tað er ómøguligt at yvirhalda eitt slíkt forboð sum í Kanada, so meiningsleyst sum tað er. Við reglunum í Alaska eru í hvussu er skipaði viðurskifti, umframt at tær eru ein ásannan av, at veiða til egið brúk kann ikki vera nøkur hóttan móti nøkrum stovni.

Her kann skilast til, at orsøkin, til at fiskivinnan í Alaska tykist at vera betri skipað enn í Kanada, er, at í Alaska verður fisivinnan skipað av myndugleikunum í sjálvum Alaska.

Sum í øðrum fiskivinnusamfeløgum er gongdin í Sitka eisini upp og niður. Sambært hagtølum hevur veiðan í 90-unum ligið millum 23 og 35 mill. pund og veiðivirðið millum 22 og 32 mill. dollars.

Tað kann staðfestast, at meðan okkara fiskivinna fór í botn fyrst í 90-unum, fór hon í topp í Alaska.

Felagsliga er Alaska og USA annars nógv øðrvísi fyri enn vit. Fakfeløg eru fá og veik. Men teir ymsu veiðihættirnir skipa seg tó í áhugafeløg, og teirra fremsta endamál er"lobbying, t.v.s. at royna at ávirka og kanska hótta politikkarar og onnur, sum hava vald. Hetta er eitt kent fyribrigdi í USA, og er eitt slíkt áhugafelag nóg stórt, kann tað fáa sera stórt vald.



Her er enn ein fiskimaður í Sitka.

## Tøkk til Julie

Julie skal hava tøkk fyri hennara beinasemi. Vit koma uttan iva at hava samband við hana framyvir, og vit fara at frætta meira frá henni sum frá líður.

Hetta kundi næstan verið í Føroyum. Men agnið er laksur.





Hetta er bert ein partur av útróðrarbátunum í Sitka.

## Higar avreiðir Julie:

# Fiskavirkið SPC í Sitka lønar arbeiðsfólki eftir royndum

Í Sitka máttu vit sjálvsagt eisini vitja eitt flakavirki, og Julie fekk okkum eina avtalu um at hitta stjóran á Seafood Producer's Cooperative, sum eitur Craig Shoemaker. Hann var sera fyrikomandi og greiddi Óla Jacobsen og Pál Weihe frá øllum spurningum viðvíkjandi fyritøkuni.




*Vørumerkið hjá fyritøkuni.*



*Her arbeiða teir svartan tosk. Drongurin á myndini heldur einum toski.*

Tað er tað heilt serliga við hesi fyritøku, at fiskimenn eiga hana sjálvir, og má hon nærmast roknast fyri at vera eitt lutafelag, eins og Fiskasølan var í gomlum døgum.

Hetta er tað elsta og størsta lutafelagið í Norðuramerika.Tað varð stovnað í 1944 fyri at bróta tað monopol, sum tá var á økinum, og var hetta, so merkiligt tað ljóðar, á A-vitaminøkinum. Upprunaliga var fyritøkan bert grundað á keyp av kalva, har bert livurin varð tikin, tí tað var her, at A-vitaminirnar fingust. Seinni kom fyritøkan eisini at umfata annan fisk. Tó hevur hin sum høvuðsreglu, at hon bert keypir húkaveiddan fisk. Hetta er tann fiskur, sum hevur bestu góðskuna, og sum mest fæst fyri á marknaðinum. Hetta merkir, at teir keypa fisk fyrst og fremst frá bátum, sum veiða við "trolling" t.v.s. dyrging, og línu. Og á heimasíðuni hjá fyritøkuni verður eisini gjørt nógv fyri at reklamera fyri hesum veiðihættum.

Upprunaliga var hetta virkið í Anchorage, sum er størsti býur í Alaska. Men ein jarðskjálvti í 1964 legði virkið í oyði, og avrátt var at byggja tað aftur í Sitka, og hetta hendi í 1982.

SPC hevur einar 500 lutaeigarar, og eru teir á allari vesturstrondini í USA. Julie er so ein av teimum. Har teir ikki sjálvir hava virki at taka ímóti, hava teir virki, sum taka ímóti teirra vegna. Hetta gera teir so langt suðuri sum í Kalifornia. Tikið verður ímóti í 5 ymsum støðum.

### Lutaeigararnir fáa reella virðið

At virkið er eitt lutafelag merkir, at tað eru lutaeigararnir, sum fáa yvirskotið av virkinum. Fyrst fáa teir ein prís. Síðan fáa teir eitt eftirgjald, og tá árið er gjørt upp, fáa teir eitt bonus. Hetta merkir, at teir prísir, sum eru umrøddir niðanfyri, við bonus verða eini 10% hægri.

Tey fiskasløgini, sum eru høvuðsframleiðslan á virkinum, eru:

### Laksur

Her eru fimm sløg av laksi. Laksur verður bæði seldur í heilum líki og virkaður. Talan er bæði um feskan og frystan laks. Og talan er um laks, sum bæði er frystur umborð og á landi. Hildið verður, at eini 8% av kalvanum verður frystur umborð.

Laksurin verður veiddur við dyrging, og hetta er ein trygd fyri góðsku.

Tað eru umleið 375 dyrgjarar, sum avreiða til SPC, og av hesum eru 125 í Sitka.

Laksur er avgjørt tað, sum mest verður keypt av, nevniliga eini 2700 t. Prísurin á laksi er sera ymiskur, alt eftir slagi og stødd, men Julia roknaði við at fáa einar kr. 15 pr. kg, sum er nógv lægri enn tað, sum kundi roknast við fyri bert fáum árum síðani.

### Kalvi

Keypt verða eini 700 t av kalva í støddunum 15 til 100 kg. Kalvi verður virkaður sovæl feskur sum frystur. Prísurin liggur millum 40 og 50 kr. pr. kg.

### Svartur toskur

Black cod er eitt fiskaslag, sum vit ikki kenna nakað serlig til. Hann er svartur og líkist toski, men hevur einki við tosk at gera. Hann minnir meira um svartkalva í smakki. Og prísurin er ein heilt annar enn fyri annan fisk, nevniliga uml. kr. 55 pr. kg.Tikið verður ímóti einum 800 t av hesum fiskaslagi árliga.

### Tað loysir seg at arbeiða støðugt

Í Sitka verður tilsamans tikið ímóti 4.500 t av fiski. Afturat hesum verða arbeitt eini 1.500 t fyri onnur. Samlaða nøgdin er tískil um 6.000 ella sum eitt miðal føroyskt virki.

Her arbeiða eini 80 fólk í hásesongini, sum er summarhálvuna, og sigast kann, at arbeiðsfólkið her hevur ein áhugaverdan starvsfólkapolitikk.

Fyrst er at siga, at í USA verða minstulønir settar við lóg, so nýggj arbeiðsfólk fáa hesa sum byrjanarløn. Annars eru tímalønirnar hesar:

Fyri fyrstu 500 tímarnar:
7,50 dollars

501-1200 tímar:
8,25 dollars

1201-2400 tímar:
9,00 dollars

2401 tímar og meira
10,65 dollars

Hetta merkir, at eftir at hava arbeitt í hálvt annað ár hækkar tímalønin við uml. 40% frá uml. kr. 50 til



*Virkið hjá SPC.*



*Stjórin Craig Shomaker.*

Framhald á næstu síðu



*Óli Jacobsen saman við stjóranum á virkinum hjá fiskimonnum.*



*Inni á virkinum.*

kr. 70. Afturat hesum kemur eitt bonus, sum er einar 4 kr. um tíman.

Umframt hetta rindar fyritøkan ymsar tryggingar fyri starvsfólkið, og fyri arbeiðsfólk, sum kemur uttanífrá, verður veitt innivist, sum saman við mati kostar um kr. 100 um dagin.

Arbeiðsvikan er 40 tímar, og fyri tað, sum arbeitt verður meira enn hetta, verður goldin yvirtíð. Frítíð og frítíðarløn er sera ymisk í USA, men tað mest vanliga, vit hava hoyrt um, er ferian 3 vikur.

## Eingin skattur til statin

Her kann verða nevnt, at í Alaska sleppa tey sera væl við skatti. Í USA er skipanin annars tann, at goldin verður ein federalur skattur til samlaða “landskassan”. Síðani verður goldin ein skattur til sjálvan statin.

Men í Alaska verður eingin skattur goldin til statin, og hetta er oljuni fyri at takka. Hon gevur nú so nógv av sær, at hon ikki bert ger tað óneyðugt at gjalda beinleiðis skatt, men hon gevur eisini grundarlag fyri at gjalda borgarum ein “oljucheck”, sum er einar 1.000 dollarar pr. persón. Tískil rinda borgarar statinum bert federalan skatt, og fyri eina miðalinntøku er skatturin bert eini 20%. Hetta ger eitt slíkt arbeiði hampiliga lønandi. Men sagt verður, at vanligar vørur eru dýrari her enn í USA annars. Hetta er orsakað av flutningskostnaðinum.

Skoytast kann uppí, at tað er ikki bert eydnan ongan skatt at gjalda. Hetta merkir, at tað eru ikki so góð ráð til almennar vetingar. Nú eru tað republikanarar, sum sita við ræðið í statinum. Teir hava lovað ikki at hækka skattin. Í staðin fara teir nú at loyva leiting eftir olju í sárbærum økjum. Hetta eru umhvørvisfólk í øðini um. Men hetta leggur fólkið í Alaska ikki tað stóra í. Tey eru meira áhuga í vælferð enn í umhvørvinum.

Men at umhvørvisfólk liggja, sum tey hava reitt, er ein onnur søga. Við at spilla sínar atkvøður til seinasta forsetaval til eitt umhvørvisvalevni, Ralph Nader, sum ongan møguleika hevði, gjørdu tey tað, ið var avgerandi fyri, at tann umhvørvisfíggindaligi Bush varð valdur.




– Góðgæti
– Vikubløð
– Soft ice
– Milk shake
– Bakaravørur
– og mangt annað

**Kioskin hjá Ingu**
v/ Ingu Joensen
Sandavágur – tlf. 333839

J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo



**JÓLABORÐHALD**

Komið við á sera hugnaliga JÓLAFERÐ við Norrönu og haldið Jólaborðhald umborð.

Prísur fyri hvønn
úr kr. 600,-
Matur & drekka ikki íroknað

JÓLA-CRUISE ERU HESAR DAGAR:
- 20.–24. nov.
- 27. nov. –1. des.
- 4.–8. des.
- 11.–15. des.

UNDIRHALD
MATUR

**Úr havinum**
Stórt sildaborð
Roykt og urtaviðgjørdur laksur
Rækjur og skeljadjór

**Alskyns steikir so sum:**
Stokt dunna við súreplum og sviskum
Fleskasteik við reyðkáli
Roastbeef við remuladu og stoktum leyki
Heilstokt lambstjógv
Heilstoktur oksaháryggur

**Flógvir réttir so sum:**
Tartelettir við góðari fyllu
Fiskaflak við remuladu
Nýstoktar frikadellur við reyðkáli

**Stórt ostaborð**
Við stórum úrvali av ostum, víndrúvum o.l.

**Dessertborð við m.a:**
Heimagjørt rís à la'mande við kirsiberjasós
Fruktsalat við rákremi
og alskyns køkur

JÓLAKEYP
HUGNI

Umframt stórt jólaborðhald, verður hvørt kvøld undirhald við føroyskum bólkum og einstaklingum.

**20. – 24. Nov:**
**Undirhald:** Robert McBirnie
**Orkestur:** Jóan Magnus Band

**27. Nov.– 01.Des:**
**Undirhald:** Hilmar Jan Hansen
**Orkestur:** Havkallar v/m.ø. Ronnie Nielsen

**04. – 08. Des:**
**Undirhald:** Robert Mc.Birnie
**Orkestur:** Vestmenn

**11. – 15. Des:**
**Undirhald:** Hilmar Jan Hansen
**Orkestur:** Terje Rasmussen Band

Keypið jólagávurnar á ferðini
Meðan Norröna liggur í Hanstholm verður skipað fyri innkeypstúri til Thisted.



SMYRIL LINE

rætt til at fleyga lomviga, sum ikki fanst í Svínoy, í bjørgunum í Fugloy. Tað er tó ivasamt, hvussu nógv varð gjørt burturúr hesum.

Torvskurðurin hjá fugloyingum í Svínoy helt á inntil 1963.

Her skal verða skoytt uppí, at eitt húsarhald í Svínoy nýtti einar 140 leypar av torvi árliga. Restin varð skorin í Fugloynni, men hetta var nógv verri torv. So tá nakað serligt skuldi gerast, sum t.d. bakast, tá var tað tað betra torvið úr Svínoy, sum skuldi nýtast.

Eliesar minnist ikki grúgvu á Kirkju. Men kanska var ein í Hattarvík, tá Eliesar var smádrongur.

Annars minnist Eliesar, tá vatnið varð innlagt, so sigast kann, at hann hevur upplivað alla ta menning, sum yvirhøvur hevur verið í samfelagnum.

Eliesar minnist eisini, at tey veltu korn. Hetta kundi ikki minst vera galdandi undir 1. heimsbardaga, tá einki korn varð innflutt.

## Skúlagongdin

Eliesar fór so í skúla sjey ára gamal. Lærarin var Símun Michael Zachariassen, sum var pápabeiggi hansara. Símun Micahel var kendur sum mentamaður, og hetta hevur eisini merkt skúlan. Símun Michael var við í teimum rørslum, ið vóru tá. Umframt í tjóðskaparrørluni var hann eisini við í fráhaldsrørsluni. Tey lærdu ikki føroyskt. Lærarin mátti eftir reglunum enntá undirvísa á donskum, men hetta tók Símun Mikael ikki so tungt. Tað var eisini sonur hansara, Louis, sum um hendan spurning segði: "Lóg er lóg og lóg skal brótast". Nakað um ta tíðina, tá Eliesar fór úr skúlanum, gjørdist Karolina Matras lærari. Hon lærdi næmingarnar føroyskt, og hetta hevur ávirkað so mikið, at Eliesar kom eisini at lesa og at skriva føroyskt.

Í skúlanum var bara ein flokkur, og í hvussu er í 1925 vóru útvið 30 børn í skúlanum. Lærarin skuldi eisini røkja skúlan í Hattarvík, so skúlagongdin hevur verið hálv.

Lívið hjá børnunum var annars arbeiði og spæl. Tað vóru nógv børn í bygdini, og tey spældu tey spølini, sum vóru vanlig tá. Tá grasið var sligið, varð spælt á bønum. Men hetta varð ikki dámt um várarnar, tá grasið skuldi hava frið at vaksa fram til hoyggingina.

Børnini hjálptu til heima, tá tey vóru so fræg, og tað var almikið at gera. Børnini skuldu gera alt vanligt arbeiði, sum gjørt varð í eini vanligari bygd. Um tað so var at bera tøð, sluppu børnini ikki undan.

Eitt, sum vísir, hvussu langt av landi skotin tey búðu, sæst av tí, at eingin regluligur postur gekk til Fugloyar fyrr enn í 1914. Undan tí fingu tey postin, tá tey fóru inn í Sund eftir agni ella slíkum ørindum. Pápin var kommunalforstandari bæði fyri Fugloy og Svínoy. Hevði hann ørindi, fekk hann sær skjúts inn á Norðtoftir. Um nakar hevði brúk fyri at kom til Fugloyar, varð boðað frá við breiddum laki, sum varð lagt so sjónliga á Svínoyarlandinum, at tað sást á Kirkju. Tá var at manna bát at fara til Svínoyar. Tað sama var við grindaboðum. Tá varð lakið breitt á ymiskum støðum, alt eftir hvar grindin var.

Annars kom telefonin fyrr til Svínoyar enn Fugloyar. Um t.d. brúk var fyri læknahjálp, var tað tá eitt stórt framstig at kunna rógva til Svínoyar og ringja hagani - heldur enn at skula rógva allan teinin inn í Sund!

Tað kann verða nevnt her, at í hvørji av Norðoyggjunum var ein útbúgvin jarðamóður, so hóast umstøðurnar ikki vóru sum í dag, hevði hetta stóran týdning fyri trygdina á útoyggj.

## Árarnar vóru álitið

Eliesar man vera ein av teimum fáu eftirlivandi, sum hevur roynt útróður á gamla hátt. Hann var til skips um summarið og róði út um veturin. Hetta var ein sera manningarkrevjandi vinna. Í dag verður útróður við línu ikki roknað sum nakað, ið krevur stóra manning. Men tá í tíðini varð eitt áttamannafar ikki roknað fyri at vera mannað, um tað ikki vóru átta mans við. Men høvuðsmunurin millum tá og nú er, at høvuðsarbeiðið tá var at rógva. Her mátti manningartalið verða eftir støddini á bátinum. Tað skal eisini skilast til, at tá var sjálvsagt einki sum æt línuspæl, so línan mátti dragast inn við handamakt. Róð varð bæði suðureftir og norðeftir. Men Kirkja lá væl fyri, so teinurin var vanliga ikki so langur. Eliesar metir, at tað kundi vera ein tíma hvønn vegin at koma á og av fiskileið undir vanligum umstøðum.

Egnt var í troð, sum vit enn kenna tað. Í hvørjum kassa vóru eini 10 stykki á 60 favnar, og vanliga vórðu settir 4 kassar ella 40 stykkir. Egnt varð við øðum og goggum, sum teir dreggjaðu inni í Sundi. Øðan mátti vera fesk, og tað var goggan sum oftast eisini, goymd í goggukøssum.

Sum kunnugt krevur lína bæði flot og søkk, og tey kundu ikki keypast í handlinum. Sum flot nýttu teir kálvar, sum eftir serliga viðgerð vórðu pumpaðir upp, og spunsl varð sett í hálsin á kálvinum. Tað mest vanliga var annars grindakýkar, men hesir vóru ikki so lættir at útvega í Fugloy, har grind ikki kom. Kálvar, sum vórðu nýttir til kýkar, máttu ikki opast sum vanligt, so teir vórðu flettir gjøgnum hálsin, og vórðu síðan tjøraðir innan. Viðhvørt var brúk fyri at taka spunslið úr fyri at blása meira luft í kýkin. Tað skuldi vera so sjóverksligt!



*Kirkjumenn skjóta bát.*



*Hetta er hellan, har fugloyingar avskipaðu torvið. Á myndini sæst ein lítil gjógv. Viðhvørt varð báturin lagdur inn í gjónna, og tá bar til at lossa torvið beint niður í bátin. Hetta lætti nógv um. Hinumegin fjørðin er bygdin á Kirkju.*



*Kálvakýkur og grindakýkur.*



*Línutroð og kleppur.*



*Lendingin á Kirkju. Teknað av Fritjof Joensen.*

*Framhald á næstu síðu*



*Her síggja vit nakrar av torvheiðunum hjá fugloyingum á Svínoynni.*

Søkkini vóru rundir steinar, sum hol var borað í, og síðan ein bukt drigin ígjøgnum. Í endanum varð tó altíð nýtt dregg.

Annars minnist Eliesar eisini væl tann forna siðin, at tað varð sungið, tá bátarnir fóru avstað til útróðrar, og tá teir komu aftur. Hann hevur sjálvur verið við til tað, men heldur at hesin siður var um at verða lagdur av, tá hann var komin til mans.

Her kann verða lagt afturat, at á sumri, tá bert kundi roynast við smærri bátum, varð roynt við snøri.

### Útróðrardagurin í 1921

J. Símun Hansen skrivar í 2. parti av “Havið og Vit”, at longst helt forna útróðrarlagið seg í útbygdunum. So seint sum í 1930 róðu fugloyingar út við árabáti, og sum dømi, um hvussu vandamikið hetta kundi vera, tekur hann søguna um ein hættisligan útróðrardag á vári í 1921. Hendan dagin var Eliesar eisini við sum 15-16 ára gamal, og sigur hetta eisini nakað um, hvussu hann eisini á hesum økinum hevur upplivað ta gomlu tíðina.

Hendan umrødda dagin vóru teir farnir at egna. Hann vaks vindin so mikið, at teir í fyrsta umfari ongan veg fóru. Men so linkaði aftur, og tá fóru tey trý áttamannaførini “Samognin”, “Rólant” og “Keisarin” sær avstað. Og at hetta vóru áttamannafør merkti eisini, at tað vóru 8 mans við hvørjum av bátunum. Eliesar var við “Rólanti”.

Hetta vísti seg bert at vera ein skái, og skjótt vaks hann vindin so nógv, at teir ikki kundu hava full segl á.

Farið varð út á Sandgrunnin, har nógvur fiskur var í torranum. Nú ráddi um at bera skjótt at. Línan varð sett og lagt varð á at draga beinanvegin. Tá var vindurin so nógvur, at tað var ikki hugsingur um at sleppa vestur um Urðina og síðani heim til Kirkju. Har var einki at gera uttan at royna at sleppa sær inn á Skarðsvík, sum er norðantil á Fugloynni, og at royna at bjarga sær á land her. Men eisini her tyktist at vera læst og fyribundið. Tá bátarnir komu heim um Skoparan, stóð alt í eini glaðu. Men nú var so eingin annar møguleiki enn at royna Skarðsvík. Tað gekk spakuliga, men at enda komu teir inn á Skarðsvík. Teir sá ikki tespuligt út, brimið stóð í grasið. “Rólant” og “Samognin” vóru komnir undan “Keisaranum”. “Samognin”, ið var tann fyrsti, hevði fingið tveir mans á land, og vóru teir Jóa Pól og Jóan Jakku, meðan tað hjá hinum ikki var hugsingur um at koma móti landi.

Her lógu so allir bátarnir, meðan menninir tosaðu um, hvat ið skuldi gerast. Teir avráddu at rógva beint inn í Mølina og bjarga tí, sum bjargast kundi, sjálvt um tað bert vóru tveir mans á landi at taka ímóti teimum.

“Keisarin” var fyrstur at rógva inn. Teir løgdu bátin fyri, sum um tað var til kappróður. Bíðaðu eftir eini stórari fylling, tóku knappliga á og fylgdu henni. Stoyturin var ómildur, ein steinur kom upp í tofturúmið. Allir lupu út. Teir gryntu ikki, men teir lestu seg eftir stokkunum, til teir fingu fast undir føti.

Hinir bátarnir høvdu eygleitt, hvussu tað gekst og gjørdu av at halda á eitt sindur ytri. “Rólant”, sum Eliesar var við, var betur fyri, og nú vóru jú tíggju mans at taka ímóti. So skjótt sum hann stoytti, vóru allir á honum og mestsum bóru hann leysan av briminum. Hann slapp so at siga óskaløður.

Nú var so “Samognin” eftir. Brimið var vaksið, so teir stúrdu fyri, hvussu hetta mundi fara at gangast. Men brádliga taka teir á og stevna beint inn í Mølina. Allir á landi lupu oman, hugtiknir og óttafullir av teirri sjón, teir vóru vitni til: Langt úti fingu teir eitt stórt brot, og tað reið um snarið, at báturin fór eftir endanum. Innari fekk hann fleiri grunnbrot og fyrsta, sum hann tók, soraðist framskuturin í stýriborð. Í somu løtu lupu allir út og komu sær upp á land. Og hervið vóru allir bjargaðir.

Tá bátarnir ella rovini av teimum vóru drignir niðanfrá, fóru menn at fáa sær ein bita. Síðan var takið at vinna upp hús. Teir vistu, at heimafólkið var bangið, og tí sendu teir tveir mans undan at boða frá. Og tað fór eisini sum eldur um bygdina, tá tveir mans dagaðu uppi við Eggjagarðslíð í skýmingini, og stúranin og óttin vendist til lætta og gleði.

Annars var tað tungt at ganga heim. Vanliga tók teinurin 1½ tíma, men líkindini vóru jú ring, og menninir vóru illa fyri, so Eliesar minnist ilt aftur á túrin. Men tað var sjálvsagt lítið ímóti, at teir vóru á lívi. Ein av monnunum hevði stívt bein, og hann gekk til Hattarvíkar, hagar tað var styttri.

2. partur av samrøðuni við Eliesar Sørensen verður í komandi blaði

Les eisini frásøgnina á næstu síðu um, tá beiggi Eliesar, Mourits Sørensen, datt fyri borð



*Her sæst Kirkja av vegnum til Hattarvíkar.*



*Úr hesum húsinum eru nakrir sera kendir føroyingar við eftirnavninum Zachariassen ættaðir. Talan er um systkini Zacharias, sum var skipari, Jógvan, sum var amtslækni, Louis, sum var telefonstjóri og politikkari og maðurin aftanfyri ódeyðiligu orðini “lóg er lóg og lóg skal brótast” í samband við málstríðið, og Símun Petur, sum var kendur sum lærari og politikkari. Eliesar vaks upp í húsum, har endin vendi inn ímóti hesum húsunum.*

## Teir bygdu hetta land

# Mórits fyri borð

Hetta er skrivað av Líggjasi í Bø:

Líggjas Sørensen av Kirkju átti skonnartina "Karin". Líggjas var sjálvur skipari, og teir vóru á veg heim úr Grønlandi í 1934, tá teir vóru fyri einum skaðatilburði.

Niðanfyri verða 3 aðrir av manningini nevndir, sum høvdu við hendingina at gera: Mórits, bróður skiparans, av Kirkju og Hans Jakku Hansen og Jákup Matras, sum báðir vóru uttan av Oyri.

Birni Hansen, bóndi á Norðoyri, hevði hoyrt søguna frá pápanum, Hans Jakku, og skiparanum, Líggjasi.

Teir vóru á veg heim úr Grønlandi. Veðrið var ringt, og teir roknaðu við ódnarveðri. Teir, sum vóru á vakt, fingust við at lække seglini.

Brádliga merktist á skipinum, at tað fekk ein sjógv. Hans Jakku, sum lá í koyggjuni, men var vakin, sær tá, at svágurin, Jákup, leypur av koyggjuni og fer við ferð - í berum undirbuksum - upp ígjøgnum leidaran og uppá dekkið og fram á bógvin. Hann toyggir seg, so langt hann røkkur, út um stokkin og fær í hondina á Móritsi, uttanborðs! Róp kom so í, at maður var farin fyri borð, og straks vóru allir menn á dekkinum. Teir fingu eina lissu um Mórits og fingu drigið hann inn um aftur.

Hans Jakku spyr aftaná Jákup, hvussu tað bar til, at hann soleiðis knappliga leyp av koyggjuni og rann fram á bógvin júst har, sum Mórits var uttanborðs og fekk bjargað honum. Jákup segði, at tað var eins og onkur segði við hann, at hann skuldi fara.

Mórits, sum nú er 95 ára gamal og býr á Vistarheiminum í Klaksvík, minnist henda tilburðin.

Spurdur svarar hann: "Tað var, tá vit fingu tann stóra sjógvin."

Og so greiddi hann frá, hvussu hann upplivdi tilburðin umborð á "Karini".

Hann øtlaði veðrið, og teir roknaðu við ódn, og teir, sum vóru á vakt, fingust við at lække seglini, fyri at kunna leggja hana uppí. Bara Líggjas, skiparin, og Mórits vóru har frammi á dekkinum. Mórits fór fram í stýriborð og Líggjas í bakborð.

Sum vanligt var á skonnartunum, stakk eitt langt sprit fram úr skipinum. Mórits var komin heilt fram ímóti stevninum og stóð og toygdi seg út um at surra forseglini. Tá var tað, at tann stóri sjógvurin breyt, og alt í einum var Mórits leysur av skipinum og kundi sjálvur einki ávirka tað, ið síðani hendi.

So brádliga kendi hann, at annað beinið varð kílað fast, har stákið frá spritinum var fest í skipssíðuna, niðarlaga á bógvnum. Hann minnist, at hann var í einum serligum leðurstyvlum við hørðum halum. Í hesi merkiligu støðu stóð hann so eina løtu. Og hann minnist, at hann kendi seg tryggan.

Líggjas sá bara - tá sjógvurin var av - at Mórits var horvin, og hann ivaðist ikki í, at hann var farin av øllum.

So er tað, at Jákup er uppi yvir Móritsi og toyggir seg so langt, at hann fær í hondina á honum. Róp kom í, og skjótt komu aðrir til og kastaðu eina lissu um Mórits, og drógu hann upp á dekkið.

Mórits var í bestu árum og kimiligur maður, men aftaná kendi hann seg ússaligan og illa til passar. Hann var tá leiddur aftur í skiparakahúttina og ballaður í koyggjuna hjá skiparanum. Men hann fekk einki varandi mein av hesum.

Tá hann var liðugur at greiða frá, skoytti hann uppí:

"Tvær ferðir í mínum langa lívi á sjónum var eg deyðadømdur, men kom kortini frá tí við lívinum. Hetta var fyrru ferð. Hinaferð var árið eftir við "Carlton", tá Pætur Franklin, bróður, gjørdi hitt stóra bragdið og bjargaði okkum."

Meðan hann greiddi frá hesum, sat Pætur Franklin, sum nú er 93 ára gamal og eisini býr á Vistarheiminum, undir liðini á honum.

Mórits er føddur 02/06 1908

Hann fór fyrsta túrin til skips 14 ára gamal við "Ternuni", og sigldi samanhangandi við ymiskum skipum til 1972. Seinast var hann við "Stellu Karinu". Oftast var hann lastamaður umborð.

Tá Mórits nú tekur samanum, sigur hann, at hann hevur havt eitt gott lív.

Mórits búði alla sína tíð í heimbygdini, úti á Kirkju, til hann fyri nøkrum fáum árum síðani flutti inn á Vistarheimið í Klaksvík, har eisini bróður hansara, Pætur Franklin, býr.

Mórits var giftur við Kristionnu úr húsunum Har norðuri í Stovu, har hann giftist inn. Tey fingu 3 børn: Katrin, Sunnvá og Pól, sum øll búgva í Havn.



*Við Carlton í 1934: Petur Petersen, Joen Jacobsen og Mourits Sørensen.*



*Hetta eru nakrir rættiligir knassar, frá 93 til knapt 98 ára gamlir. Frá vinstru Eliesar, Pætur Franklin og Mourits.*

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
gevur
MEIRI fyri
MINNI
Ring um lýsingar á tlf. 31 15 69 ella send okkum ein teldupost á ff-blad@post.olivant.fo

BAADER®
Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.
Pf. Petur Larsen
Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

# Eyðfinn úr Vági fær laksin hjá Juliu í Alaska til forbrúkaran

Hetta er so tann triðja greinin um laksin, frá tí hann verður drigin upp úr sjónum í Alaska, og til hann endar í einum handilsdiski í USA.

Her er tað, at ein føroyingur kemur inn í myndina. Tað er tann 51 ára gamli Eyðfinn Tausen úr Vági. Vit hittu hann á virki hansara tann 25. September, ikki langt frá flogvøllinum í Seattle. Ferðin úr Alaska til Canada gav nakrar tímar í Seattle, og hesar vildu vit nýta til fulnar. Fyrst skulu vit greiða eitt sindur frá um Eyðfinn.

Hann er sonur Jacobinu og Jacob Paula, sála, Tausen í Vági. Teir eru tríggir beiggjar. Hinir báðir eru Mannbjørn og Kaj, sum báðir búgva í heimbygdini. Longu sum heilt ungur var Eyðfinn "bitin" av fiski, tá hann arbeiddi á flakavirkinum í Vági.




*Hetta er verksmiðjan hjá Selectfish.*



*Tær ymisku vørurnar til hvønn kunda verða pakkaðar í flamingo-kassar.*



*Soleiðis sær ísurin út.*

### Til USA

Í 1975 fór hann til USA at arbeiða sum danskur konsulathjálpari. At arbeiða á donskum konsulatum hava fleiri aðrir føroyingar gjørt, og tað hevur víst seg, at hetta er ein frálík upplæring í altjóða virksemi. Fyrst var Eyðfinn í New York. Síðan fór hann til New Orleans, Los Angeles og seinast í Ancorage í Alaska.

Hetta gav sjálvsagt góðar royndir og kennskap til USA, har hann tískil kom at virka sovæl á eystursum vestursíðuni. Aftaná hetta fór Eyðfinn at arbeiða innan fiskivinnu í USA. Hann arbeiddi soleiðis í trý ár fyri eitt reiðarí í Alaska, og fekk eisini høvi at vera ein mánaða við einum trolara hjá teimum.

Hendan fyritøkan fór á húsagang, og tá fór hann at arbeiða hjá reiðarafelagnum í hesum økinum. Hann arbeiddi seinni hjá Baader við at selja flakamaskinur.

Hann giftist við Ullu, sum er dóttir danskar innflytarar, sum búgva niðri á Los Angeles- leiðini. Tey eiga trý børn.

### Fekk egið virki

Frá 1990 til 1996 arbeiddi hann hjá eini fyritøku, sum keypti og seldi fisk, og í 1997 keypti hann seg, saman við einum øðrum, inn í Selectfish í Seattle, har hann nú er stjóri. Her er uppgávan at keypa, virka og selja fisk. Hesin fiskur verður fyrst og fremst keyptur úr Alaska, sum jú ikki er so langt burturi. Tað tekur bert 2-3 tímar at fáa fiskin við flogfari úr Alaska og til Seattle. Tað skal sigast, at meginparturin av teimum fiskasløgum, sum Eyðfinn fæst við, eru ókend hjá okkum. Víst hevur hann laks, sum er týdningarmesta fiskaslagið, hann fæst við, men hetta er villaksur, og síðan er tað t.d. stør, svørðfiskur, skeljar o.a.

Tað, sum vit hava áhuga fyri og trupulleikar av sum upsa og hýsu, kennir Eyðfinn als ikki til. Annars er virksemið fyrst og fremst grundað á feskan fisk. Men teir eru ein av teimum fáu fyritøkunum, sum selja laks veiddan við dorg, og sum er frystur umborð. Hesin smakkar eins væl og feskur laksur. Tað er eingin aling í Alaska, men Eyðfinn selur aldan laks úr heimstatinum Washington, men við hesi framleiðslumynd eru Føroyar ikki so áhugaverdar.

Hóast sambandið við Alaska so fæst Eyðfinn heldur ikki við Alaska pollock, sum er tað fiskaslagið, sum nógv mest er av í Alaska. Hetta er jú bílig rávøra, sum tí heldur ikki hevur tann stóran áhuga.

### Fiskur úr Sitka

Tað, sum er áhugsvert í samband við hesa grein, er, at stórur partur av fiskinum kemur úr Sitka, og júst frá SPP, sum vit hava umrøtt í eini aðrari grein.

Tað, sum er fyrst og fremst er av áhuga hjá føroyingum, er, hvussu Eyðfinn selur sína framleiðslu.

Fyrst kann verða nevnt, at á virkinum arbeiða eini 30 fólk. Her er galdandi sama lóggáva um minstuløn, sum umrødd er fyri Alaska. Men byrjanarlønin er hægri her. Hon byrjar við 10 dollarum, 65 kr., um tíman og endar við 13, t.v.s. 85 kr. Fyri arbeiði omanfyri 40 tímar um vikuna verður latin 50% í yvirtíðarløn.

"Fidusurin" hjá Eyðfinni er, at hann selur beinleiðis til handilsketurnar, og her er tað handilsketan "Whole Foods", sum er hansara størsti kundi. Tað eru 150 sølumiðstøðir um




*Her síggja vit Eyðfinn frammanfyri eini deild av Whole Foods, har lidna vøran verður seld.*



*Hetta er sonur Eyðfinns, Michael. Hann er undir útbúgving sum grannskoðari og forvinnur sær lummapening við at arbeiða hjá pápanum.*



Her verður laksaflak skorið við hond.

alt USA, sum eru fastir kundar.

Tað, sum er umráðandi, er at vita nágreiniliga, hvat hvør av teimum ynskir at fáa hvønn dag av teimum ymisku vørunum.

Tískil verður tann ynskta vøran pakkað í 55 lbs (25 kg) flamingokassar, og hon verður pakkað klár at seta í kølidiskin. Hetta merkir eisini, at tað kunnu vera fleiri sløg av vørum í hvørjum kassa, men tað er tilskilað uttaná hvørji eskju, hvussu nógv tað er av hvørjum í kassanum. Vøran skal sjálvsagt koma fram heilt fesk, eins og hon ikki má skalast av beinleiðis sambandi við ís. Men hetta verður greitt við, at ísurin, sum verður nýttur til kølingina, er í plastikki, og hetta tryggjar, at alt er í lagi við góðskuni.



Eyðfinn saman við makkaranum.

### Beinleiðis í søludiskin

Hvønn dag kl. 16 kemur so eitt flutningsfelag eftir lidnu vøruni og tryggjar, at vøran er frammi morgunin eftir - hvar sum helst í USA. Hetta merkir, at í flestu førum verður hon flutt við flogfari.

Vit báðir høvdu ikki so nógva tíð. Men vit fingu tó tíð at fara at vitja eina av sølumiðstøðunum hjá Whole Foods, hagar Selectfish letur sínar vørur.

Her fekst eisini ein mynd av, hvat ið er at fáa av fiski. Undirritaði hevur verið inni í rættiliga nógvum sølumiðstøðum í USA og hugt eftir fiski, og eisini leitað eftir føroyskum fiski. Men onganstaðni havi eg sæð eitt so stórt útval, sum júst inni her. Men her var ikki allarminsta spor av fiski, sum kundi verið úr Føroyum.

Tað skal eisini sigast, at her sæst heldur ikki tað minsta til, at tað var kreppa á fiskamarknaðinum, sum merkir mundandi minni inntøkur til fiskimannin. Her skulu bert nevnast nøkur dømi um útsøluprísir, sum eru umroknaðir eftir tí í løtuni lága dollarkursinum 6,50:

| | |
|---|---|
| Laksur | 185 kr. kg |
| Rækjur | 140 - |
| Skeljar | 185 - |
| Laksabúffur | 115 - |
| Tunfiskur | 185 - |
| Kalvi | 100 - |
| Black cod | 185 - |
| Toskur | 100 - |

Hetta var alt feskur fiskur og í flestu førum flak. Men tað er í hvussu er ikki bíligt at hava fisk til døgurða. Í frystidiskinum vóru onnur fiskasløg, men hesi vóru als ikki í slekt við okkara.

Selectfish hevur í umbúna at selja fyritøkuna, og hetta skal so vera til teirra størsta kunda Whole World. Hetta vil í hvussu er tryggja fyritøkuna framyvir, tí á hendan hátt koma teir í samband við enn fleiri sølumiðstøðir. Eyðfinn og makkarin hjá honum hava so tryggjað sær 4 ára sáttmála. Tá hendan tíðin er farin, er Eyðfinn kanska komin til ein slíkan aldur, at hann kann taka sær eitt sindur meira av løttum.

Tað er eingin ivi um, at ein maður sum Eyðfinn er ein fongur fyri Føroyar. Vit kunnu uttan iva læra av honum. Hann hevur eisini verið føroyingum til hjálpar á ymsum økjum. M.a. tá tað vóru teir, sum spurdu hann um ráðgeving um íløgu í fiskiskapi í Alaska. Hann ráddi frá, og royndir hjá øðrum føroyingum vístu eisini, at hesi ráðini mundu vera á eini góðari leið.

Tey, sum annars hava hug at frætta frá Eyðfinni, kunnu fara inn á hansara heimasíðu:

www.selectfish.com

Hjá okkum var hetta ein sera áhugaverd vitjan. Og tað var ikki minst áhugavert, at vit kundu lýsa hetta samband millum veiði, framleiðslu og sølu, sum vit hava kunnað gjørt í blaðnum í dag, og so tað at tað stendur ein føroyingur við endan!



Eyðfinn við laksi - klárur at koyra í kølidiskin.





Uttaná eru merki, sum vísa, hvat ið er í kassanum.



Her er vøran - klár at verða avskipað.





Og her er laksur og kalvi saman við øðrum fiskasløgum komin í handilin í Seattle, og hervið er ferðin endað av fiskimiðinum í Alaska.

# Til minnis um Poul Meyer

Tann 6. oktober fór Poul Meyer Olsen til gravar í heimbygd síni Svínoy. Sjálvur kom eg at kenna Poul Meyer í 1979. Tá vóru vit nøkur, ið høvdu leitað okkum til Svínoyar eitt vikuskifti. Hjá teimum flestu var tað fyrstu ferð, tey vóru á oynni, so hetta var sera forkunnugt. Vit búðu niðanfyri húsini hjá Poul Meyer og Solveig. Vit kendu sonin, Osmund, og tað endaði eisini við, at vit vórðu øll boðin inn á gólvið og merktu tá fyrstu ferð fløvan í hesum heimi.



*Hendan myndin er frá gullbrúðleypinum.*

Síðan tá hevur verið væl okkara millum. Farið varð til Svínoyar nærum á hvørjum ári síðan tá, og ein føst støð á "rutuni" var at fara inn til tey bæði. Onkuntíð varð gist eisini. Her kundi ein føla seg sum eitt húsfólk. Tey bæði, Poul Meyer og Solveig, vistu ikki, hvussu blíð tey skuldu vera, so hetta er nakað, eg altíð komi at minnast.

Tað var eisini skjótt, at ein varnaðist, at aftanfyri hendan friðarliga, lítiðlátna persónin var ein kempa, sum hevði avrikað fleiri brøgd enn tey flestu.

Á vegginum í stovuni hongur eitt heiðursbræv frá Carnegiegrunninum. Hetta stavar frá, tá Poul Meyer sum 15 ára gamal bjargaði 3 ára gomlu Ásbjørg frá tí vissa drukni-deyðanum út fyri lendingina í Svínoy.

Forsøgan er tann, at Hjalmar Hátún var lærari í Svínoy frá 1924 til 1938. Hann legði dent á at læra børnini at svimja.

Hetta kom rættiliga Poul Meyer til góða hendan dagin í 1935, tá Ásbjørg fór á bláman niðri í fjøruni. Svínoyingar fóru at draga bát, men tá báturin var drigin, vóru ongar árar, so farast mátti niðan í bygdina eftir árum. Hetta tók sjálvsagt drúgva tíð, sum kundi gerast avgerandi fyri møguleikanum at bjarga gentuni. Men tá kemur tann 15 ára gamli Poul Meyer leypandi. Hann var longu av bestu svimjarum, og hjá honum var einki at bíða við. Hann legði í bláman og svam út til Ásbjørg og fekk hana til lands. Tá var hon illa stødd, og bæði minnast, hvussu fast hon tók um hálsin á Poul Meyer, so hann mundi mist ondina.

Árið eftir fekk Poul Meyer Carnegie heiðurslønina fyri sítt bragd. Eisini fekk hann 300 krónur, sum tá var ein hálv árssløn hjá fiskimanni.

Tá Malla Jacobsen fylti 100 ár í fjør, var Asbjørg eisini har úti, og tá kundu vit taka myndina av teimum báðum saman. Ásbjørg hevur, sum rímiligt er, ikki gloymt sín bjargingarmann. Sum dømi um viðurskiftini teirra millum kann verða nevnt, at Poul Meyer takkaði Ásbjørg fyri alt! Hon svaraði aftur, at var tað nakar, sum skuldi takka, mátti tað vera hon!

Sjálvt um vit hava nevnt tað fyrr, vilja vit endurtaka eitt annað bjargingarbragd hjá Pouli. Tað var



*Poul Meyer sum ungur fiskimaður.*

undir krígnum, at svínoyingar varnaðust eina gummiballu uttan fyri lendingina. Hetta var tilfar, sum kundi nýtast til at gera gummiskógvar burturúr, og hesum var stórur tørvur á tá á døgum.

Teir flotaðu bát, men í tí at báturin verður leysur, verður ein maður fastur og fer á bláman. Hann fer undir, og Poul hugsar, at her má okkurt gerast, og hann greiðir frá:"Eg meddaði eftir, hvar hann mundi vera. So krøkti eg føturnar fastar í bekkin, og so rendi eg høvdið niður í sjógvin." Tað skal nevnast her, at Poul Meyer var av størstu monnum, so hann rakk rættiliga langt niður. So heppið var tað, at hann kom beint á mannin, og fekk hann hálaðan upp, so hann fekk tikið fast í bátin. Tá var neyðugt at rógva út frá, so báturin ikki endaði í fjøruni, og so taka mannin inn. Poul helt, at her mátti ein hægri makt hava verið uppi í. Men dirvið og skilið hjá Pouli man eisini hava átt sín part.

Poul Meyer var nú blivin 85 ára gamal. Hann var so líðandi viknaður, men kortini kundi hann vera úti í Svínoy seinasta summar. Men nú vóru kreftirnar farnar.

Poul hevur verið fiskimaður alla sína arbeiðstíð, og hevur hann verið kokkur. Og tað sigst ein góður kokkur! Hann fór sum heilt ungur at sigla við "Polo", hetta skipið sum er ein slík ímynd av Svínoy, og har mammubeiggi hansara, Símun, var skipari. Poul sigldi leingi, og var hann at enda eisini við teimum nútímans línuskipunum. Hann var seinast við "Strandingi".

Annars var Poul ættaður úr kongshúsunum Úti í Bø. Foreldrini hjá honum vóru Hanus og Karin, sum var systir 101 ára gomlu Mallu, sum tískil er mostir Poul. Annars eru Poul Meyer og Jukim Olsen eisini systkinabørn.

Poul og Solveig giftust í 1949. Solveig er ættað úr Hattarvík. Søgan um sambandið teirra millum er eisini ein lýsing av útoyggjamentan. Solveig kom til Svínoyar sum hoyggingarfólk, sum tað ikki var nóg mikið av í Svínoy. Her komu tey bæði at kennast, og tað rann saman teirra millum. Tey náddu tískil at liva saman í einum eydnuríkum hjúnarlagi í 54 ár.

Poul Meyer fekk eina virðiliga jarðaferð, sum eisini var ein lýsing av tollyndinum hjá Poul Meyer. Talari var Heri Joensen, prestur, sum jú er úr Svínoy. Hann greiddi væl frá lívssøguni hjá Poul Meyer, sum hon er endirgivin í hesi grein. Hann tók eisini til hansara menniskjansligu eginleikar sum trúskap og umhugsni.

Síðani tosaði Jukim Olsen í kirkjuni. Sum kunnugt er Jukim í brøðrasamkomuni, men tað fall heilt náttúrligt, og tað var heilt í andanum hjá Poul Meyer, at sovæl kirkja sum brøðrasamkoma luttóku í jarðarferðini.

Jukim tók eisini til, hvussu hegnigur Poul Meyer var. Hann nevndi, at teir báðir høvdu ein menningartarnaðan beiggja. Tá Poul Meyer kom aftur av skipi, og við sær hevði teir bátar, sum hann hevði evnað til á túrinum, ja, so var tað júst hesin menningartarnaði beiggi hansara, sum skuldi hava tann største og vakrasta bátin. Annars er tað ein vøkur søga, hvussu tey í Svínoy tóku hond um síni menningartarnaðu. Ikki bert familjan, men øll bygdin var góð við tey og ansaðu eftir teimum.

Poul Meyer umboðaði tað besta í føroyskari bygdamenning. Hann mundi vera tann seinasti, sum skar torv í Svínoy. Hetta gjørdi hann fyri at varðveita ein gamlan sið.

Børnini hjá teimum báðum, Poul Meyer og Solveig, eru Hanus, Osmund, Regin og Marjun. Tvey búgva í Klaksvík og tvey í Havn.

Friður verið við minninum um Poul Meyer.

*óli*



*Her síggja vit tey bæði Ásbjørg og Poul. Millum tey hómast á vegginum heiðursbrævið frá Carnegie, sum Poul fekk fyri at bjarga Ásbjørg.*

---

Tíðindi frá Vinnuhúsinum:

## Hýsuprísurin er lutfalsliga høgur í Føroyum

Tað verður ofta tosað um, at fiskimenn fáa ov lítið fyri hýsuna. Rætt er tað, at ynskiligt var, at prísurin var hægri, men heimsmarknaðurin fyri hýsu er ógvuliga veikur í løtuni. Í síðstu viku var føroyski fiskamarknaðurin tann, sum lat mest fyri hýsuna í mun til fleiri marknaðir rundan um okkum.

Miðal landingarprísurin fyri hýsu frá føroyskum bátum var í fjør 11,08 kr. Men í ár er prísurin nógv fallin. Í síðstu viku var miðalprísurin á Fiskamarknaði Føroya 8,93 kr. fyri hýsu 2 og 6,22 kr. fyri hýsu 3.

Men tað er ikki bara í Føroyum, at hýsuprísurin er fallin. Á auktiónini í Hanstholm var miðalprísurin á hýsuni í síðstu viku 7,33 kr. fyri hýsu 2 og 5,93 kr. fyri hýsu 3. Aðrastaðni í Danmark sum t.d. í Tyborønn og Skagen var hýsuprísurin nøkulunda á sama støði sum í Hanstholm.

Í Íslandi var miðalprísurin á kruvdari hýsu fyri tveimum vikum síðani uml. 7,00 kr.

Intrafish skrivaði í vikuni, at í Noregi var miðal landingarprísurin fyri hýsuna 5,79 kr. (dkk), tá hýsan kom frá norskum bátum. Men útlendskir bátar, sum høvdu lagt upp í Noregi, fingu uppaftur 0,50 kr. minni í miðal.

Prísirnir frá útlendsku marknaðunum kunnu tó ikki samanlíknast beinleiðis við føroysku prísirnar. Til dømis verður vanliga nógv meira tikið uttanlands fyri avgreiðslu, sølugjald og í yvirvekt. Harafturat verða slíkir prísir í Noregi vanliga uppgivnir fyri avhøvdaðan fisk.

# Bjargingarútgerð
## á sjógvi og landi

*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.*
*Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*




- Bjargingarbátar
- Bjargingarnet
- Yvirlivilsisdraktir
- Flótidraktir
- Bjargingarvestar
- Bjargingarkransar
- Epirbar/neyðsendarar
- Radartranspondarar
- Eldsløkkjarar
- Eldávaringar
- Branddraktir
- Umvælingar
- Eftirlit

**P/F Gummibátatænastan**
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo



# Skal skipið vaskast?
**Tosið fyrst við EYSTUROYAR REINGERÐ**

- Serkunnleiki innan vasking av aptering
- Vasking av maskinrúmi
- Reinsa teppi
- Bona gólv
- Reinsa koyggju og forheng
- Reinsa gamalt bonivoks
- Seyma nýggj forheng
- Útvega máttur, brúsuforheng, voksdúkar v.m.
- Brúsubakkar "Homequeen vinyl"
- Eisini leggja vit nýtt linoleum ella teppi á dúrkið

**Eysturoyar Reingerð**
Postboks 41 · FO-650 Toftir · tlf./fax: 44 89 88
fartlf: 22 53 50 · teldupostur: nch@post.olivant.fo



# MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64



we make fishing more profitable



**Vit framleiða og umvæla øll sløg av trolum, so sum:**
■ Rækjutrol ■ Botntrol ■ Flótitrol ■ Semipelagisk trol

**Vit framleiða og umvæla snurpunótir til:**
■ Loðnu ■ Makrel ■ Sild

**Vit framleiða og umvæla nótir til alivinnuna umframt:**
- Vaska og impregnera nótir
- Levera komplettar fortoyningar, akker, tog o.a.

**Annars hava vit alla útgerð til trol, nótir og alivinnuna**

**VÓNIN LTD.**

**Høvuðsskrivstova:**
Vónin P/F
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 444 246
Telefax 444 579
www.vonin.com

**Tórshavn:**
Álaker
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

**Miðvágur:**
Telefon 33 29 46






**Vit framleiða:**
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

◆◆◆*vælkomin inn á gólvið*

**SNØRISVIRKIÐ**
**í Klaksvík**
Tel. 455254 - Fax 457254
www.snorisvirkid.fo

**TEYMAVIRKIÐ**
**í Runavík**
Tel. 473000 - Fax 473001
www.teymavirkid.fo

VASTT ✔ 451171



## Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945

## Skatting av kosti hjá fiskimonnum takast upp aftur:

# Sera ivasamt grundarlag fyri avgerð hjá Toll og Skatt

Vit hava havt fleiri greinir um ta mannagongd, sum skattamyndugleikarnir eru farnir at nýta við at skatta kostútreiðslurnar hjá fiskimonnum, har hesir sambært sáttmálan verða trektir av partinum hjá fiskimanninum, tá avroknað verður.

Vit hava reist málið vegna ein fiskimann, sum siglir við donskum skipi, og vit eru sera sannførdir um, at skeivt er atborið. Serstakliga halda vit grund vera fyri at fýlast at málsviðgerðini, sum bert tekur tey sjónarmið við, sum skattamyndugleikin kann nýta í síni sak, meðan alt annað als ikki er við.

Hetta er annars fullkomiliga í samsvar við okkara fatan um hugburðinum hjá almennu umsitingini og um rættartrygdina hjá borgaranum.

### Sjónarmiðini hjá myndugleikunum

Vit hava nú fingið skrivligu sjónarmiðini hjá Toll og Skattstovu Føroya í hesum máli. Her vísa teir til eina avgerð hjá landsskattanevndini heilt aftur til 1995, sum hevur givið teimum viðhald í einum ítøkiligum máli, sum tó er sera prinsipielt.

Her verður m.a. sagt:

*Sambært § 25 í skattalógini verður fyri skattskyldiga inntøku roknað alt, sum hin skattskyldigi hevur lagt inn í pengingini og peningsvirði. Tað vil siga, at eisini virðir og ágóðar, sum hin skattskyldigi fær, verður sett í skatt.*

*Kostur hevur ongantíð verið mettur sum frádráttarbær útreiðsla hjá løntakara. Men í skattalógini er ein serlig heimild í §29, 11) viðv. sjófólki umborð, har tað stendur, at til skattskylduga inntøkuna teljast ikki virði av vistarhaldi hjá sjófólki umborð. Við øðrum orðum: Har sjófólk umborð fáa frían kost, verður hetta virði ikki sett í skatt. Henda regla er ein serlig heimild fyri teir, sum sigla; hon kann ikki nýtast aðra staðni, t.d. á landi á einum arbeiðsplássi... Fáa soleiðis fólk á landi á einum arbeiðsplássi, t.d. á einum hotelli, frían kost, er hesin skattskyldugur ágóði.*

Hetta kann nú ljóða sera tilforláturligt, um tað bert verður hugt eftir tí eina stykkinum í teirri eini greinini í skattalógini, sum hetta snýr seg um, og endamálið bert er at fáa eina niðurstøðu, sum er til skaða fyri borgaran.

### Tað sum ikki er við

Tað er alt, sum bendir á, at hetta mál als ikki er kannað tað allarminsta, og er hetta beinleiðis í stríð við "undersøgelsesprincippet", sum vit lýsa aðra staðni í greinini.

Men vit hava kannað málið, og vilja vit leggja veruleikar á borðið, sum vísa eina heilt aðra mynd.

Tað var í 1939, at tað í eini kunngerð varð ásett, at fiskimenn og sjómenn skuldu gjalda skatt av virðinum av fríum kosti umborð. Hetta virðið varð ásett til at vera eitt ávíst krónutal pr. mánaða, sum skuldi leggjast afturat inntøkuni. Og tí skuldi siglingartíðin tilskilast í sjálvuppgávuni. Vit minnast, at hetta tal í 50-unum var kr. 80 um mánaðin.

Í 1939 fingu fiskimenn yvirhøvur sambært sáttmálan "frían kost". Tó við tí fyrivarni at einki í verðini er "frítt". Er t.d. kostur fríur, so kann roknast við, at prosentparturin til fiskimenn er so mikið minni. Hetta er alt ein spurningur, hvussu sáttmálin er samansettur.

Tá vit koma fram til 1953, verður sáttmálin hjá stórum parti av fiskimonnum broyttur, soleiðis, at "manningin heldur seg sjálva við kosti". Hetta virkaði soleiðis, at kosturin fór av partinum hjá hvørjum manni. Men fiskiparturin, sum skattaður varð av, varð roknaður sum upphæddin, sum var eftir, tá kosturin var trektur frá. Og virðið av fría kostinum varð tískil, sum greitt frá, lagt omaná inntøkuna í sjálvuppgávuni.

Í 1963 fáa vit eina nýggja skattalóg, har ásett verður, at manningin ikki skal skattast av virðinum av fríum kosti. T.v.s. at umrøddu kr. 80 um mánaðan fullu burtur. Tá vóru allir sáttmálar soleiðis, at einki var longur, sum æt fríur kostur hjá fiskimonnum. Antin varð hann tikin av sjálvum partinum hjá hvørjum manni, ella fór hann av óbýttum. Tá rindaðu fiskimenn upp til helvtina av kostútreiðslunum.

### Eingin ivi um, hvussu hetta skuldi skiljast

Tí hevur eingin ivi verið um, hvussu hetta skuldu skiljast, nevniliga at fiskimaðurin rindar skatt av teirri upphædd, hann fær í hondina, eftir at kostur er goldin so ella so. Hetta er sjálv definitiónin av tí parti, sum skattur skuldi gjaldast av, og hevur einki við loyvdar frádráttir í sjálvari skattalógini at gera.



*Karsten Hansen landsstýrismaður í fíggjar- og búskaparmálum*

Soleiðis hevur tað eisini verið praktiserað heilt fram til 1995, tá "onkur" í Toll og Skatt fer at umtulka tað, ið higartil hevur verið lagt orðingina í lógini, og soleiðis sum hon hevur verið praktiserað gjøgnum 50 ár. Hetta er undir øllum umstøðum heilt greitt í stríð við tann "retssædvane" og "administrative praksis", sum framvegis er galdandi í kongaríkinum, soleiðis sum hetta er lýst aðra staðni í greinini.

### Eingin samanhangur

Eitt annað er tað, at tað er als ikki samanhangur í hesi tulking. Um Toll og Skatt veruliga meinar, at "fríur kostur" bert er skattafríur, um hann veruliga er fríur, so skuldu teir eisini farið í holt við teir fiskimenn, har kostur fer av óbýttum, og fiskimenn t.d. rinda helvtina av kostinum sjálvir. Hann eigur sambært hesum prinsippi eisini at verið skattaður, men tá vildi als ikki hingið saman hjá skattamyndugleikunum. Men ein kann als ikki føla seg tryggan fyri, at hetta ikki fer at henda. Tí ræður um at fáa jarðlagt hetta sjónarmið so dyggiliga, sum tað kann gerast.

### Skapar mannamun

Eitt annað er tað, at henda tulking hjá Toll og Skatt júst skapar mannamun millum fiskimenn og eisini millum fiskimenn og aðrar borgarar. Sambært verandi reglum fær ein nótarmaður í Hirtshals ikki eitt oyra í frádrátti fyri ferðing heim til Føroya. Allur samdøgursfrádrátturin fer nevniliga til at dekka kostin. Ferðaútreiðslurnar hava verið mettar upp til kr. 15.000. Hinvegin vita vit um borgarar, sum ferðast við bussi millum bústað og arbeiði. Teir fáa koyripening sum dekkar 100% av teirra útreiðslum. T.v.s. at føroyskir borgarar fáa frá 0 til 100% endurgoldið av eini samanberligari útreiðslu.

Hevði tað verið so frægt, at hugburðurin í almennu umsitingini var, at víst sigur lógin so ella so, men hetta skapar eitt órættvísi, sum vit mugu bøta um. Tá kundi skipanin verið til at liva við, men hetta hendir ikki.

Her kann eisini skoytast uppí, at eitt er, hvat komið er fram til í 1995 á einum greitt ófullfíggjaðum grundarlagi. Men tað ófrættakenda er, at sjálvt um myndugleikarnir fáa upp í hendurnar sjónarmið, sum kundu bent á eina aðra fatan av hesi lógáseting, so verður fullkomiliga sæð burtur frá hesum. Hetta er veruliga tað ringasta í hesum máli, at sjónarmið, sum kundu tænt áhugamálunum hjá borgaranum, verða útihýst frá viðgerðini.

Tí hevur borgarin alla grund til at kenna seg ótryggan. Men nú er málið eftir umbøn frá FF tikið upp aftur av landsskattanevndini. Fáa vit ikki viðhald her, verður farið í rættin.

---

### Undersøgelsesprincippet

Den offentlige forvaltning er underlagt det såkaldte undersøgelsesprincip. Det bygger på, at man fra myndighedens side er ansvarlig for at få de nødvendige oplysninger fremskaffet, for at der kan træffes en så rigtig afgørelse som overhovedet mulig...

### Retssædvane

Retssædvaner finder også anvendelse indenfor forvaltningsretten. Retssædvaner kan beskrives som en handlemåde, der er fulgt almindeligt, stadigt og længe efter den overbevisning, at den er retlig bindende. Man er fra forvaltningens side forpligtet til at følge gyldige retssædvaner..

### Administrativ praksis

Administrativ praksis kan beskrives, som den praksis en forvaltning har fulgt tidligere i lignende sager. Dens bindende virkning for forvaltningen varierer fra område til område. Men udgangspunktet er, at en forvaltning er bundet af administrativ praksis.

*Hetta er rættarstøðan, sum annars er galdandi í danska ríkinum. Men hetta hevur ikki minsta áhuga í málsviðgerðini í okkara politiskt/umsitingarligu skipan.*

Fiskirannsóknarstovan

Seinasta freist at lata fiskamerkir inn, sum skulu luttaka í lutakasti um 10.000 kr., er 20. oktober.

Nóatún · Boks 3051 · FO-110 Tórshavn



**Vit gera allar vanligar bilumvælingar sera bíliga - so sum:**

Oljuskift, motorjusteringar

Umvæla bremsir, koplingar v.m.

For- og bakhjólsleiðir og akslar

Og so hava vit tey vælumtóktu "TYFOON" dekkini, sum vit skifta

**Sp/f Úrvalsbilar**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444943 · 281943 · 217704

## Ískoyti til søguna um fólkaatkvøðuna í 1946:

# Tá Ringberg varð sendur til Føroyar at "lodda dýpið"

**FF-blaðið er ført fyri at geva eitt ískoyti til søguna um fólkaatkvøðuna í 1946. Hetta fingu vit í samband við 85 ára føðingardagin hjá Ásu Ringerg, sum er dóttir Hjalmar Ringberg, sum var amtmaður í Føroyum 1929-1936.**



*Her síggja vit Anders, sum var í ferðalag við Hjalmar Ringberg. Hann var væl fyri at lodda dýpið í Føroyum aftaná fólkaatkvøðuna í 1946. Hann hevði verforeldur, har annað hevði valt loysing og hitt samband.*

Søgan um fólkaatkvøðuna var jú í stuttum tann, at 14. september 1946 var fólkaatkvøða um loysing ella framhaldandi samband við Danmark, og skuldi hetta samband vera skipað sambært einum stjórnaruppskoti, ið ásetti framtíðarviðurskiftini. Tað var politisk ósemja um valmøguleikarnar, og tí vóru tað teir politikkarar, sum mæltu fólki til at atkvøða "nei", um tey ikki kundu taka undir við teim umrøddu møguleikunum. Slíkar atkvøður høvdu blivið ógildigar, men kundu tó geva eina ábending. Úrslitið gjørdist eisini ein heilt lítil meiriluti fyri loysing av gildigu atkvøðunum, men um tær ógildigu "nei"-atkvøðurnar vórðu taldar við, var ikki meiriluti. Báðir partar hildu tískil fast við, at teir høvdu vunnið.

Á tingi gjørdist meiriluti fyri loysing. Men tá hendi tað, at kongur upploysti løgtingið og skrivaði út nýval 8. november 1946. Í nýggja tinginum var ikki meiriluti fyri loysing, og hetta endaði so við heimastýrislógini í 1948.

### Anders og Hjalmar Ringberg verða sendir til Føroyar

Tað ískoyti, sum vit hava til hesa søgu, og sum ikki er kent av føroyskum søgufrøðingum, er fylgjandi:

Danski løgmáláráðharrin tók aftaná fólkaatkvøðuna avgerð um, at hann vildi lodda "stemningin" í Føroyum aftaná fólkaatkvøðuna. Hann sendi tískil tann gamla amtmannin, Ringberg, til Føroya í hesum ørindum. Ringberg varð valdur, tí hann kendi Føroyar, og hann var eisini kendur í Føroyum og hevði álit millum føroyingar. Tað hevur kanska eisini talt við, at nýggi danski amtmaðurin, C. A. Vagn Hansen, var heilt nýggjur í starvinum. Og hann var heldur ikki kendur fyri at vera tann stóri diplomaturin. Tað kundi tí vera til nyttu, um hann fekk ráð og stuðul frá tí meira royndа Ringberg. Men Ringberg vildi ikki fara einsamallur. Hann skuldi hava við sær ein persón, sum eisini var kendur í Føroyum. Hetta gjørdist Anders Røhr Jensen, sum annars var politistur. Hann var giftur við



*Hans Ringberg var á kajuni og tók avskeð við pápan, nú hann skuldi á sína "secret mission".*

Matildu hjá Gøtu-Anton, sum eisini var politistur í Havn. Tey hjá Ringberg kendu Matildu, tí hon hevði arbeitt á skrivstovuni hjá amtmanninum, meðan Ringberg var í Føroyum. Matilda gjørdist sum ein partur av familjuni. Hon plagdi at hjálpa børnunum hjá amtmanninum við at gera teirra skúlating. Hetta samband teirra millum hevur vart til hendan dag. Matilda er deyð, men Anders var ein av gestunum á føðingardegnum, og tí kunnu vit bera søguna.

Anders sigur, at hann var á veg úr Føroyum til Danmarkar við "Atlantsfarinum" tann 14. september. Hann minnist, at umborð har fegnaðist tey um, at tað gjørdist "ja" til loysing, men samstundis merkti hann eina stúran fyri, hvussu tað mundi fara at gangast við at seta samtyktina í verk.

### Til Føroya uttan at nakar skuldi vita av

Anders var heima í 14 dagar, og tá fær hann boð um at fara aftur til Føroyar í umrøddu ørindum. Teir fóru til Føroyar við "Roar", sum var leigað av donsku stjórnini at fara til Føroyar við eini sendinevnd av donskum politikkarum, ið skuldu samráðast við føroysku flokkarnar um støðuna, sum var í komin. Ein av teimum, sum var við, var Erik Eriksen, leiðari í Venstre, sum gjørdist forsætisráðharri í Danmark í 1950-53.

Tað var heilt óalment, at Ringberg og Anders vóru við. Hetta skuldi eingin vita um, tí teir høvdu alment eingi ørindi í Føroyum. Teir høvdu annars tveir kriminalpolitistar við, um nakað skuldi hent! Men teir vórðu sendir heim aftur beinanvegin, tí tað var í hvussu er friðarligt í Føroyum.

Teir vóru nærum tríggjar mánaðar í Føroyum og komu heim við seinasta ferðamannaskipinum til jóla. Hesa tíðina ferðaðust teir runt og tosaðu við ymsar persónar og myndugleikar, sum t.d. sýslumenninar, sum Ringberg kendi væl. Anders búði hjá verforeldrunum, Malenu og Gøtu-Anton. Og her fekk hann í hvussu er møguleika fyri at kunna seg um tey ymsu sjónarmiðini. Tí Anthon hevði valt loysing, meðan Malena hevði valt samband. Anders sigur annars um tey, at tá tey fóru á val, høvdu tey blýant við sær, um tann framlagdi í atkvøðurúminum skuldi brotna!

Søgan aftanfyri sambandið millum Anders og Matildu var, at hon fór niður undan krígnum, og slapp ikki heim aftur eins og so nógvir aðrir føroyingar. Matilda arbeiddi á einum dómarakontóri í Keypmannahavn, og tá hittust tey bæði og giftust í 1942.

Hans Ringberg, sonur amtmannin, kennir eisini hesa søgu. Hann minnist, at hann var sjálvur niðri á bryggjuni at siga farvæl, tá "Roar", fór avstað. Hann heldur tó, at tað var statsministarin, Knud Kristensen, sum hevði sent teir báðar til Føroyar.

Vit fara nú at kanna, um tað í skjalagoymslunum í Danmark kann liggja nøkur frásøgn frá hesi ferðini. Um so var, kundi hetta verið eitt enn meira forvitnisligt íkast til hendan partin av Føroya søgu.



*Ringberg, amtmaður, Andrass Samuelsen og Sundorph, fúti, taka ímóti kongi í Fuglafirði.*

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

# Starvslesandi í London og Brússel

(Stagiaire)

**Søkt verður eftir lesandi til ávikavist sendistovu Føroya í Bretlandi (London) og sendistovu Føroya í Evropasamveldinum (Brússel). Starvstíðin er frá februar 2004 til juli 2004 ella fyri lestrarhálvárið.**

**Uppgávur**
Tann starvslesandi verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á avvarðandi sendistovu, serliga við atliti at samskifti viðvíkjandi handli og fiskivinnu.

**Førleikakrøv**
Tann starvslesandi eigur at vera lesandi føroyingur við hægri háskúla, sum í minsta lagi hevur útbúgving á bachelor stigi.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið verður ávikavist Sendistova Føroya í Bretlandi, 55 Sloane Street, London SW1X SR ella Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels. Sendistovurnar eru skipanarliga samrunnin partar av Løgmansskrivstovuni.

**Setanartreytir**
Størvini eru skipað eftir teim reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi á staðnum og er ólønt; men viðbót verður latin eftir nøktandi uppihald. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Stuðuls-stovninum. Stuðul verður veittur til bústaðar-útreiðslur.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra í uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, tlf. 351010, ella til John Rajani, sendimann í London, tlf. +44 (0)20 7333 0227 ella til Hákun J. Djurhuus, sendimann í Brússel, tlf + 32 (2) 233 08 55.

**Umsóknir**
Umsóknir, prógv, c.v. og viðmæli verða at senda

*Løgmansskrivstovuni*
*Tinganesi*
*FO-100 Tórshavn*
*Telefax +298 35 10 15*
*t-postur: info@tinganes.fo*

og skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 29. oktober 2003.

***Løgmansskrivstovan** er fyrisiting hjá løgmanni. Hon fevnir millum annað um uttanríkistænastuna við uttanríkisdeild og sendistovum í ávikavist Bretlandi, Danmark og Evropasamveldinum og situr fyri málum, ið eru løgd til løgmann sambært stýrisskipan Føroya umframt uttanríkismálum.*

## Tíðindaskriv frá Føroya Prentarafelag

Føroya Prentarafelag hevði aðalfund 27.09.03, og vórðu hesar broytingar gjørdar í nevndini:

Knúd Thorsvig, sum var formaður felagsins seinastu fýra árini, bar seg undan afturvali.

Hanna M. Michelsen varð vald til formann og Kári Olsen til skrivara.

Nevndin er sostatt henda:

Hanna M. Michelsen, formaður
Tummas Pauli Thomsen, kassameistari
Kári Olsen, skrivari.

Føroya Prentarafelag hevur sáttmála við Føroya Prentsmiðjueigarafelag, sum gongur út 1. mai 2003.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá elskaði maður mín, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jóhan Ziskason**
(fyrrv. leiðari á Vaktar- & Bjargingartænastuni)

lá sjúkur, andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prest fyri góð orð. Ein serlig tøkk til Monu, Jóhan og Hildibjartur fyri vakran sang og guitarspæl í kirkjuni. Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir. Tøkk til starvsfólkið á B6 á Landssjúkrahúsinum. Somuleiðis hjartans tøkk til tykkum øll, ið á ymiskan hátt hjálptu til, bæði áðrenn og aftaná jarðarferðina. Tøkk til sangarar, kirkjutænarar, berarar, gravarar og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu.

Tøkk til tykkum, ið stóðu fyri ervinum.

**Sigrid, Ziska, Kirsten og Johild**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri hjálpsemi og sýnda samkenslu, tá elskaði maður mín, pápi, verfaðir, abbi og bróðir okkara

**Dagbjartur Johansen**

lá sjúkur, andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á B6 og B7 á Landssjúkrahúsinum. Ein serstøk tøkk til sjúkrarøktarfrøðingarnar í dialysuni fyri tykkara umsorgan.

Tøkk til talarar, sangkórið, Dupultkvartettina og fyri aðra luttøku í sambandi við jarðarferðina.

Tøkk fyri blómur, kransar og aðrar heilsanir og tøkk til øll, ið fylgdu.

Tøkk til tykkara, ið stóðu fyri ervinum.

*Familjunnar vegna*

**Elma, Dóra, Pætur og Elin**
**Katrin, Mats og lítli Bjartur**

*Stúrið ongum fyri, nei, latið í øllum tað, sum tit ynskja, koma fram fyri Gud í ákallan og bøn við tøkk!*
*So skal friður Guds, sum stígur upp um alt vit, varðveita hjørtu og hugsanir tykkara í Kristi Jesusi.*
***Fil. 4, 6-7***




# Jesus sá - og sær

Og hann sá, at tað var strævið hjá teimum at vinna fram, tí at teir høvdu andróður,...
*Mark. 6,48*

Lærusveinarnir vóru í bátinum, mitt úti á vatninum, og høvdu andróður.

At rógva ímóti vindi og aldum hevur altíð verið strævið og vandamikið.

Hví stríddist Jesus ikki saman við teimum, ella hví kom hann ikki og slættaði sjógvin? Hevði hann gloymt teir?

Tað síðsta, teir sóðu til Jesus, var, at hann sendi túsundvís av fólkum til hús, eftir at hann hevði mettað tey við fimm breyðum og tveimum fiskum. Mannamúgvan undraðist, og tey ætlaðu at gera Jesus til kong, breyðkong. Hýrurin var góður á fólkinum og á lærusveinunum.

Lærusveinarnir høvdu ongan hug at fara í bátin, men Jesus noyddi teir. Hann sá óivað vandan fyri hugmóði, tí teir høvdu "luttikið" í breyðundrinum við at býta breyðið út.

Jesus var eisini í "vanda," tí hann var ikki komin fyri at vera breyðkongur, men frelsari heimsins. Tí sendi hann fólkið frá sær og fór einsamallur niðan á eitt fjall fyri at biðja.

Bíblian sigur, at Jesus sá bátin frá bønarstaði sínum. Hann sá eisini, at teir høvdu andróður - at teir stríddust.

Lærusveinarnir óttaðust aldurnar, hóast Jesus hevði biðið teir fara avstað.

Teir vóru bangnir og kendu seg einsamallar, hóast teir sótu við hvør sínari kurv av breyðmolum, sum lupu av.

Sum menniskjan er lítið broytt.

Eru vit í vanda, so stara vit lætt bara uppá tað, sum hóttir, og vandin tykist vaksandi.

Fáa vit andróður á lívsleiðini, kenna vit okkum lætt veik, einsamøll og gloymd.

Gleðiboðskapurin er, at mitt í øllum hesum sær Jesus, hvar og hvussu tú ert staddur.

Hann sær aldurnar, sum skola inn yvir títt lívsskip.

Hann kennir tín andróður til fulnar, tí hann er royndur í øllum. Heb. 4,15

Hóast tú ert í myrkri, sær hann teg, tí fyri hann er náttin klár eins og dagur. Sl. 139.12

Í fjórðu náttarvøku kom hann gangandi eftir aldunum. Aldurnar, sum vóru orsøk til ræðslurnar hjá lærusveinunum, vóru eitt gólv, ein vegur, sum Jesus gekk eftir.

Jesus hevur enn alt vald á himli og á jørð.

Fær hann loyvi at koma inn í tín lívsbát og verða dagligur skipari har, so kanst tú vera tryggur - hóast stormar, andróður, ótta, sjúku….og deyða.

Er Jesus skipari, ber leiðin heim.

*Stýr míni skútu í ódn og logn,*
*stýr tú í ljósum og niðu,*
*stýr tú, eg vera vil tín ogn,*
*stýr tú mær, Jesus, eg biði!*

***Ms. 650***

# NÝGGJASTU HAGTØLINI
## um føroyska samfelagið

- við enskum undirteksti

Ein sera hent handbók hjá øllum, ið fáast við at kanna og viðgera føroyska samfelagið.

Sum nakað **nýtt** fylgir fløga við árbókini.

Á fløguni eru allar talvur í **pdf**- og **excel**-sniði. Hetta ger tað munandi lættari at arbeiða við tølunum á telduni.




FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR
www.fsg.fo

**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
*Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir*
*Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur*
*Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni*
*Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari*

*... sjálvandi til besta prísin !!*

FARPACK

Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com

# Línubustir og goggar

Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar



Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

**Fløttisliθ** (limur í Føroya blindafelag)

S P/F Andersens Beding
490 Strendur
TLF: 44 89 87 / 22 27 18
FAX: 44 19 32

## Beding & Maskinverkstaður

nannidiesel

Bátamotorar frá 10 til 310 HK.

Generatoranleg frá 9 til 72 KVA

- Ljóleysir
- Reinir
- Álítandi



MOTUL

Motul Motor olja.
Ein av bestu olju í heiminum.

Olja til eitt hvørt endamál

- Vit skifta olju.

THISTLE MARINE
Peterhead Ltd



Trol-Blokkar. Stødd 3" til 24" Dia

- Vit hava blokkar á lagur

Guerra

Kranar frá 3 til 30 t metur

- Marine-kranar.
- Lastbila-Kranar.



· Upphálingar av bátum upp til 30 BRT.
· Allar umvælingar av jarn, træ og glastrevjabátum
· Salg, íseting og umvalingar av motorum v.m
· Alt arbeiði innan rustfrítt og aluminium so sum Línurennir, Egningartraktir, mastrar og annað
· Dykkara til at skera av skrúvu v.m.

**Ring á telefon: 44 89 87**

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA | Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna - Blaðið verður sent øllum skipsmanningum | Lýsingar Tlf: 311569




Tey flestu av lógarupp-skotunum, sum verða løgd fyri løgtingið eru deyðssjúk...
- So er tað kanska orsøkin til, at tey skulu hava fleiri viðgerðir.

*****

- Tað er sanniliga krút í nýggja stjóra okkara.
- Tað má sigast. Hann hevur longu sprongt fíggjarætlanina...!

*****

Bóndin: Skalt tú hava lomb til heystar?
Havnarmaðurin: Eta hestar lomb?

*****

Lýsing í bløðunum:
- Hundur til sølu. Hann skilir alt, sum tú sigur, hann aktar bara ikki...!

*****

Konan kom inn á løgreglustøðina:
- Maður mín fór út at keypa sigarettir í gjárskvøldið, og síðani havi eg ikki sæð hann.
- Jamen, sigur vakthavandi løgreglumaðurin, - tú kanst lána eina sigarett frá mær....!

*****

Tað er ikki so lætt at fáa eina parkeringsbót, sum fólk halda, tí tað er næstan ómøguligt at finna eitt parkeringspláss.

*****

- Pápi, pápi barometrið er fallið! rópti sonurin.
- Men er fallið so stórt, at tú skal vera ræðslusligin? spyr pápin.
- Nei, bara ein metur, men tað brotnaði kortini!

# Levi Joensen 70 ár



Seinasta sunnudag fylti Levi Joensen 70 ár. Tey eru fá, sum eru so knýtt at sjónum sum júst Levi. Foreldrini hjá honum vóru Armgarð og Dávur í Gerðum. Dávur var ein av okkara kendastu fiskimonnum í síni tíð. Nøvn sum “Ernestina” og “Skálanes” verða sett í samband við Dáva. Og hann kom í samband við hesi skip at uppliva alt frá sorgarleiki og til rokveiðu, sum eisini var galdandi fyri so nógvar av okkara fiskimonnum.

Tað vóru vist allir synirnir hjá Dáva, sum gjørdust fiskimenn, og sum hava gjørt seg galdandi í okkara sjóvinnu, eisini á landi. Tað var tískil eisini náttúrligt hjá Levi at leita hendan vegin. Levi fór fyrst við trolaranum“Dragabergi”, og síðan fór hann við “Skálanesi”, sum var eitt sera framkomið skip í síni tíð. Seinni kom hann eisini at føra“Skálanes”, tá hann fekk skiparapappír. Hann hevur ført nógv skip. Hann var millum teir fyrstu, sum fóru at royna við kraftblokki við“Kletti”, og seinni sigldi hann burturav við kraftblokkaskipum.

Her kom hann at sigla uppá Hirtshals, og fekk her kall at fara at virka millum teir nógvu føroysku fiskimenninar, sum komu hagar, fyrst og fremst við sovæl føroyskum sum donskum kraftblokkaskipum. Hetta var byrjanin til Malta, sum vit annars fleiri ferðir hava umrøtt her í blaðnum.

Vit hava sagt tað fyrr og fara at endurtaka tað: Føroyski sjómaðurin hevur verið signaður við einum hópi av fólki úr øllum samkomum, sum hava viljað hjálpt uppá sjómannin á ymsan hátt. Og sjálvt um lotið stundum hevur verið kølið frá restini av samfelagnum, so hava teir siglandi altíð vitað, hvar teir hava havt umrøddu fólk. Levi er so ein av teimum, og tað skal hann hava tøkk fyri.

Og ikki er at forgloyma konuna Gretu. Uttan konu hevði slíkt virksemi als ikki borið til. Sum nevnt varð her í blaðnum, tá hon fylti 70 í fjør, er tað ikki smávegis av sjálvsøknum arbeiði, sum Greta hevur gjørt saman við manninum. Hon eigur tískil ikki minstu tøkkina.

Vit ynskja Levi hjartaliga tillukku við teimum 70 árunum.



## Tíðindi frá fiskamarknaðinum

Vit fara sum eina roynd at hava tíðindi frá fiskamarknaðinum. Í hesum sambandi senda vit blaðið til øll viðskiftafólkini hjá teimum. Nógv eru kanska haldarar frammanundan, so tey kunnu lata øðrum blaðið.

Fyribils er ætlanin at hava tíðindini í øðrum hvørjum blaði fram til jóla. Undirtøkan tá fer at vísa, um hildið verður áfram. Men vit meta, at hetta skuldi verið tilfar av størsta áhuga hjá ikki bert fiskimonnum, men føroyingum yvirhøvur.

## Komandi blað

Vit meta okkum at hava sera nógv áhugavert tilfar í hesum blaðnum.Tað verður ikki minni áhugavert í komandi blað. Vit koma at hava meira tilfar úr Alaska. M.a. um fiskivinnubýin Sitka og um eina støð fyri“havbit”, har laksur verður settur út fyri at koma aftur at verða veiddur.

Frágreiðing verður eisini úr Canada. M.a. verður ein indianarabýur vitjaður! Seinni aftur hava vit eina samrøðu við indianarahøvding! Og so ikki at forgloyma, seinni partur av lívsøguni hjá skjótt 98 ára gamla Eliesar av Kirkju.

## dagsins MYND



Hesa myndina fingu vit sendandi frá Kára við Stein í Grønlandi og má hetta sigast at vera ein frægari rækja.